# FØROYAR

## – eitt land í Arktis



Møguleikar og avbjóðingar

LØGMANSSKRIVSTOVAN
UTTANRÍKISTÆNASTAN



# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Fororð | 4 |
| Ein heimspartur í broyting | 6 |
| Ein miðdepil í heimspolitikki | 8 |
| Føroyar á landnyrðingsleiðini | 14 |
| Fiskiveiða í Íshavinum | 20 |
| Gransking og útbúgving | 24 |
| Umhvørvi | 27 |
| Trygd og tilbúgving | 32 |
| Keldur | 36 |
| Orðalisti | 37 |
| Yvirlit yvir tiltøk | 38 |
| Fylgiskjal 1 | 40 |


LØGMANSSKRIVSTOVAN
UTTANRÍKISTÆNASTAN

# Fororð

Arktis er veruliga komið á dagsskránna seinnu árini. Frá at hava verið eitt øki, sum bert hevur havt vísindaligan áhuga, er arktiska økið nú vorðið ein miðdepil í heimspolitikki. Veðurlagið er lýggjari, ísurin bráðnar alt meira, og nýggj stór land- og sjóøki gerast atkomulig. Tað verður gjørligt at sigla norður um Russland og Kanada munandi størri part av árinum enn higartil. Samstundis fæst atgongd til higartil fjalt olju-, gass- og mineralríkidømi í undirgrundini.

Hesar broytingar hava stóran týdning fyri Føroyar.

Veðurlagsbroytingarnar kunnu fáa avleiðingar fyri okkara lívsgrundarlag. Hitalagsbroytingar í sjónum kunnu ávirka vistskipanina og havstreymin og harvið havtilfeingið. Broytingarnar, sum í løtuni fara fram í fiskastovnunum, hava helst samband við veðurlagsbroytingarnar. Tí er umráðandi við áhaldandi gransking fyri at skilja broytingarnar betur og fyri at vit kunnu gerast betur før fyri at gera neyðugar tillagingar. Hetta má gerast í virknum samstarvi við grannalondini.

Føroyar liggja væl fyri, bæði í sambandi við beinleiðis norðurleiðina og við vestara munnan á landnyrðingsleiðini, ið verður mett at vera tann siglingarleið, sum fær størstan týdning komandi árini. Skipaferðslan er longu nú økt á havleiðunum kring Føroyar, og væntast kann, at ferðslan økist munandi komandi árini. At virksemið økist á einum stórum øki, har ið nógvir vandar kunnu gera seg galdandi, krevur trygd og tilbúgving á hægsta stigi, bæði við atliti at trygd hjá fólki og umhvørvisvernd.

Vaksandi virksemið hevur eisini stórar búskaparligar møguleikar við sær. Talið á útlendskum skipum, sum í framtíðini fara at koma í føroyskar havnir, verður allarhelst alsamt vaksandi. Føroyskar fyritøkur fáa harvið møguleika at veita dygdargóðar tænastur til hesi skip. Hetta setur stór krøv til vinnuliga samskipan í Føroyum og marknaðarføring úteftir. Longu nú fyrireika føroyskar fyritøkur seg til at bjóða seg fram sum undirveitarar til fiskivinnuna og til náms- og oljuvinnuna, serliga í Grønlandi. Virkisfýsnið í Norðurhøvum er partur av okkara siglingarsamleika og mentan, og tað eiga føroyingar at gagnnýta sum best.

Føroyar hava drúgvar royndir í sambandi við fiskiskap sera norðarlaga. Tað hevur tí stóran týdning, at samráðingarnar um at umsita framtíðar fiskiskap í Íshavinum verða fylgdar neyvt, soleiðis at viðkomandi rættindi til møguligan fiskiskap á nýggjum fiskileiðum í Íshavinum verða tryggjað.

Búskaparliga og mentanarliga tilverugrundarlagið hjá føroyingum er líkt tí hjá øðrum arktiskum fólkum. Harumframt hava vit grundleggjandi avbjóðingar í felag, t.d. avleiðingar av veðurlagsbroytingum og at tryggja fólkavøkstur og burðardygga menning. Føroyskir serfrøðingar, sum hava luttikið í arktiskum samstarvi á ymsum serøkjum, vísa á, at felags útgangsstøðið er júst ein av fyrimununum við arktiska samstarvinum í mun til onnur millumtjóða samstørv um gransking. Føroyar eiga tí framhaldandi at menna luttøkuna í granskingarsamstarvi í arktiskum høpi. Føroyar skulu hava eina greiða politiska støðu til tær avgerðir, sum í framtíðini skulu takast um arktiska økið. Føroyar hava leingi havt ein virknan leiklut í økisbundnum samstarvi á fleiri økjum, bæði millum Norðurlondini, í útnorðri og tvørtur um Atlantshav. At Føroyar eru sjónligar og standa stinnar í arktiska samstarvinum, sum serliga er skipað innan karmarnar á Arktiska Ráðnum, er ein natúrligur liður, tá ið ræður um áhaldandi at menna støðu Føroya sum ein álítandi og virðismettur samstarvspartur í millumlandahøpi.

Føroyar hava vitan og royndir at byggja á í eini menning frameftir á norðurleiðum viðvíkjandi fiskiskapi, sigling, gransking og umsiting av náttúruumhvørvi og tilfeingi. Við góðum samstarvi við hini londini og við einum vaknum eyga fyri møguleikunum kunnu vit gera miðvísar ætlanir og menna okkum enn meira. Endamálið er at at skapa Føroyum



*Mynd: Kimberley Coole*

nýggjar møguleikar fyri menning, bæði fyri fólk, vinnulív og granskarar.

## Um útgreiningina

Í hesari útgreining verða føroysk áhugamál greinað viðvíkjandi millumtjóðaasamstarvi, vinnu, umhvørvi og gransking í arktiskum høpi. Útgreiningin er ætlað sum grundarlag undir einari breiðari politiskari viðgerð av støðu Føroya í Arktis, og hvussu Føroyar á bestan hátt fyrireika seg til nýggju kringumstøðurnar.

Føroyar eru partur av heildarætlanini *Kongeriget Danmarks Strategi for Arktis 2011-2020*, ið fevnir um Danmark, Grønland og Føroyar. Ætlanin er gjørd í samstarvi millum londini og miðar móti at styrkja leiklutin hjá Kongsríkinum sum virknum leikara í Arktis. Felags ætlanin snýr seg í flestum førum um rættiliga yvirskipað mál, ið fevna um grundleggjandi meginreglur og breitt samstarv millum partarnar. Málið er eitt friðarligt og trygt Arktis við sjálvberandi búskaparligari menning, ið virðir viðbreknu náttúruna í Arktis.

Stórir partar av viðurskiftunum í felags heildarætlanini snúgva seg um málsøki, ið vit sjálv umsita sum føroysk sermál. Landsstýrið hevur tí mett, at tørvur eisini er á einari serstakari útgreining, har ið føroysk áhugamál verða lýst.

## At skipa arbeiðið

Uttanríkistænastan á Løgmansskrivstovuni hevur staðið fyri arbeiðinum við útgreiningini. Arbeitt hevur verið í neyvum samstarvi við viðkomandi aðalráð, stovnar og áhugapartar. Ein kjarnabólkur við serfrøði úr vinnulívi, granskingarumhvørvi og almennum stovnum hevur veitt ráðgeving og leiðbeining í sambandi við arbeiðið. Í bólkinum sótu: Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, Jan Müller, stjóri í Faroese Oil Industry Group, Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum, Ólavur Gregersen, stjóri í Syntesu, Jákup Mørkøre, samskipari á Fiskivinnugransking, Fiskimálaráðið og Vilhjálmur Gregoriussen, stjóri á Vinnuháskúlanum.

Stórur dentur hevur verið lagdur á at taka allar viðkomandi partar í samfelagnum við. Sum liður í hesum hevur verið skipað fyri almennum kjakfundum og fyrilestrum, har ið serfrøðingar, granskarar og vinnulívsfólk hava givið sítt íkast til almenna kjakið. Yvirlit yvir tiltøkini er á s. 38.

## Uppskot til at skipa arbeiðið framá

Tilmæli eru til hvønn part av útgreiningini. Nøkur eru einføld at seta í verk, og onnur eru meira orkukrevjandi. Stórur munur er eisini á, hvussu nógv fígging krevst til at fremja tilmælini.

Eftir at útgreiningin er handað løgmanni, er ætlanin, at hon verður løgd fyri Løgtingið til aðalorðaskifti. Mælt verður til, at aðalorðaskiftið viðger spurningin um, hvussu tilmælini verða raðfest og framd í verki. Við støði í niðurstøðunum frá aðalorðaskiftinum eigur at verða gjørd ein virkisætlan fyri, hvussu tilmælini kunnu fremjast. Skotið verður upp, at ein arbeiðsbólkur við umboðum úr viðkomandi aðalráðum verður settur at gera uppskot til eina virkisætlan. Í ætlanini skal ábyrgd, mettur kostnaður og kravd arbeiðsorka útgreinast. Ætlanin skal síðan leggjast fyri landsstýrið til endaliga støðutakan.

# Ein heimspartur í broyting

Higartil hevur verið mett, at Íshavið verður ísfrítt stórar partar av árinum um 30-40 ár. Granskarar vísa tó á, at ísurin bráðnar skjótari enn væntað. Heldur henda gongd fram, verður mett, at stórir partar av Íshavinum verða ísfríir longu um 15-20 ár.

Veðurlagsbroytingar eru eitt altjóða fyribrigdi, ið elva til óvanligt veðurlag nógvastaðni í heiminum. Tað er tó kring pólarnar, at veðurlagsbroytingarnar eru sjónligast og hava tær ógvisligastu fylgjurnar.

Veðurlagsserfrøðinganevndin hjá Sameindu tjóðum staðfesti í 2007, at miðalhitin á arktiska økinum økist tvífalt so skjótt sum miðalhitin aðrastaðni í heiminum. Mátingarnar við fylgisveini vísa, at summarísurin er minkaður við 40 prosentum síðan 1979. Hetta hevur við sær, at sjó- og landaøki, ið higartil hava verið fjald av ísi, verða atkomulig.




*Á myndini sæst, hvussu ísurin er minkaður frá 1979 til 2012. Mynd: NASA/Goddard Scientific Visualization Studio.*

### Ríkidømi í undirgrundini

Arktiska økið er sera ríkt við olju, gass og mineral.

Almenni amerikanski jarðfrøðistovnurin „US Geological Survey" almannakunngjørdi í 2008 nýggjar metingar viðvíkjandi ráevnum í Arktis. Sambært metingum hjá US Geological Survey eru risastórar mongdir av olju- og gassi fjaldar í Arktis. Mett verður, at upp ímóti 30 prosentum av øllum ótroyttum kolvetni í heiminum eru í Arktis – harav 13 prosent av oljuni og 30 prosent av gassinum. Størsti parturin av ríkidøminum liggur tó innanfyri markið erbúskaparøki hjá arktisku strandalondunum.

### Nýggju siglingarleiðirnar

Veðurlagsbroytingarnar hava við sær, at tað verður gjørligt at sigla norður um Russland og Kanada munandi størri part av árinum enn nú. Sum frá líður fer væntandi eisini at bera til at sigla frá Kyrrahavi tvørtur um Norðpólin til Norðuratlantshav.

Við nýggju siglingarleiðunum ber til at spara tíð og brennievni, samstundis sum CO2-útlátið minkar.

Frástøðan millum Rotterdam og Yokohama minkar við sløkum 40 prosentum í mun til núverandi leiðirnar gjøgnum Suezveitina, Adenflógvan og Malakkafjørðin.

## Nýggju siglingarleiðirnar

*Landnyrðingsleiðin úr Atlantshavi til Kyrrahavs norður um Russland og Sibiria og útnyrðingsleiðin úr Atlantshavi til Kyrrahavs norður um Kanada. Sum sæst á myndini, liggja Føroyar sera væl fyri á landnyrðingsleiðini. Mynd: AMSA 2009.*




## Arktis

Arktis er eitt ómetaliga stórt øki, ið fevnir um 30 milliónir ferkilometrar. Fýra milliónir fólk búgva á økinum. Økið fevnir um partar av Kanada, USA, Russlandi, Finnlandi, Noregi og Svøríki, og harumframt Grønland, Ísland og Føroyar.

Arktis verður lýst á ymsan hátt. Landafrøðiliga verður lýsingin ofta avmarkað til økið norðan fyri pólkringin, ella har ið markið gongur suður til øki við permafrost, ella har miðalhitin í juli er í mesta lagi 10 hitastig. Men tá ið politiska samstarvið er um at røða, fevnir Arktis í roynd og veru um øll londini og fólkini á norðurleiðum, m.a. Føroyar. Sum sæst á myndini, gongur politiska markið, sum brúkt verður í Arktiska Ráðnum, suður um Føroyar.



*Mynd: Conservation of Arctic Flora and Fauna 2005*

ARCTIC COUNCIL

# Ein miðdepil í heimspolitikki

Arktis er vorðin ein miðdepil í heimspolitikki.

Útlitini til økt virksemi og til at fáa atgongd at tilfeinginum í undirgrundini hevur við sær, at londini í Arktis síggja stórar møguleikar viðvíkjandi økinum. Tí hava øll londini, m.a. Danmark/Grønland /Føroyar, orðað hvør sína heildarætlan, har ið tey lýsa síni áhugamál og politisku raðfestingar í Arktis. Strandalondini hava landgrunnskrøv til partar av íshavinum, og londini gera alsamt fleiri hernaðarligar íløgur í arktisku landslutunum. Onnur stórveldi sum ES, Kina, Japan og Suðurkorea vísa eisini økinum stóran ans.

Stóri áhugin og økta virksemið á økinum hevur havt við sær, at vandin fyri hernaðarligum ósemjum millum strandarlondini í Íshavinum javnan var á breddanum fyri nøkrum árum síðani.

Óttin fyri ósemjum og umhvørvisvanlukkum hevur havt við sær, at serliga umhvørvisfelagsskapir hava mælt til at seta í gildi ein nýggjan altjóða sáttmála fyri Arktis. Leisturin skal vera hin sami, sum í sáttmálanum fyri Antarktis frá 1961. Í hesum sáttmála vórðu øll krøv um landøki fastlæst, og staðfest varð, at Antarktis er eitt friðað øki, ið er halgað gransking. Vinnuligt og hernaðarligt virksemi er bannað í Antarktis. Í upprunasáttmálanum vóru ongar ásetingar um umsiting av fiskiskapi í Antarktis. Óttin fyri ovfisking, serliga av krill, hevði tó við sær, at sáttmálapartarnir tóku stig til at seta á stovn fiskiveiðifelagsskapin CCAMLR (Commission for the Conservation of Antarctic Marine Living Resources) í 1982.

Londini í Arktis taka als ikki undir við sjónarmiðinum um tørvin á einum tílíkum altjóða sáttmála fyri økið. Grundleggjandi munur er á Arktis og Antarktis. Fólk búgva í Arktis, men Antarktis er óbygt.

Arktisku londini eru væl før fyri at handfara menning og samstarv á arktiska økinum á skilagóðan og friðarligan hátt sambært galdandi altjóðasáttmálum og meginreglum.

Ein varði í samstarvinum um Arktis er Ilulissat-yvirlýsingin frá 2008, har ið strandarlondini lova hvør øðrum, at ein og hvør møgulig ósemja um tilfeingið á arktiska økinum skal loysast á friðarligan hátt. Støðið verður tikið í ásetingunum í Havrættarsáttmálanum hjá ST og øðrum viðkomandi altjóða sáttmálum. Yvirlýsingin staðfestir harafturat, at Arktiska Ráðið og teir mongu sáttmálar, sum longu eru galdandi fyri økið, eru nøktandi sum karmur fyri samstarv um Arktis.

Í dag eru fá, sum óttast hernaðarligar ósemjur millum strandarlondini á arktiska økinum. Herbúgvingin í arktisku landslutunum sæst heldur sum ein liður í at styrkja tilbúgvingina og at vísa umheiminum, hvør hevur ræðið á økinum. Veruligi trygdarspurningurin snýr seg tí einamest um avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum og vandanum fyri vanlukkum, sum kunnu standast av økta vinnuliga virkseminum.

### Føroyar í økisbundnum samstarvi

Føroyar hava ein virknan leiklut í økisbundnum millumtjóðasamstarvi við serligum denti á náttúrutilfeingi, burðardyggari vinnumenning, gransking og mentan.

Sum fiskivinnutjóð hava Føroyar ein týðandi leiklut í Arktiska Ráðnum og øðrum millumtjóðasamstarvi. Fyrst og fremst snýr tað seg um at virka fyri týdninginum og rættindunum at gagnnýta havtilfeingið á burðardyggan hátt, at verja umhvørvið og at tryggja ein sjálvberandi búskap.

## Arktiska ráðið

Arktiska Ráðið er einasta formliga millumtjóðasamstarv um arktisk viðurskifti. Limalondini eru USA, Russland, Kanada, Svøríki, Finnland, Noreg og Danmark/Grønland/Føroyar.

Artiska Ráðið varð stovnað í 1996. Upprunin at Arktiska Ráðnum var Arctic Environmental Protection Strategy (AEPS), ið varð stovnað í 1991. Hetta var eitt samstarv um umhvørvisvernd í Arktis. AEPS verður fatað sum fyrsta stigið at skapa trygd á arktiska økinum, eftir at kalda kríggið var av.

Í 1996 varð Arktiska Ráðið stovnað. Tá varð AEPS-samstarvið víðkað frá at hava verið eitt samstarv um umhvørvi til eisini at fevna um burðardygga menning og lívskorini hjá fólkunum í Arktis.

Arktiska Ráðið hevur ikki støði í einum bindandi millumtjóðasáttmála, men í einari politiskari yvirlýsing millum avvarðandi uttanríkisráðharrar. Semja skal vera millum limalondini um allar avgerðir. Avgerðirnar eru ikki løgfrøðiliga bindandi.

Virksemið í Arktiska Ráðnum hevur fyrst og fremst snúð seg um at gera frágreiðingar, støðulýsingar, tilmæli og leiðreglur um viðurskifti á arktiska økinum, t.d. umhvørvisdálking, veðurlagsbroytingar og skipaferðslu. Eitt dømi er viðurkenda frágreiðingin Arctic Climate Impact Assessment (ACIA) frá 2004. Mett verður, at tað er hendan frágreiðingin, ið fekk heimin at skilja, hvussu álvarsligar veðurlagsbroytingarnar eru í Arktis.

Spurnartekn hevur verið sett við leiklutin hjá Arktiska Ráðnum, nú ið so stórar broytingar henda í Arktis. Funnist hevur verið at samstarvinum, ið hevur verið hildið at vera ov veikt og ikki nøktandi sum einasta millumtjóðasamstarv um Arktis.

Arktiska Ráðið er styrkt munandi seinastu árini við einari felags skrivstovu og einari felags fíggjarætlan. Harafturat hava limalondini samtykt tveir bindandi millumtjóðasáttmálar innan fyri karmarnar av Arktiska Ráðnum. Teir fevna ávikavist um leiting og bjarging og tilbúgving í sambandi við oljudálking.

Sáttmálarnir eru dømi um, at hóast Arktiska Ráðið ikki er grundað á ein millumtjóða-sáttmála, og hóast avgerðirnar ikki eru løgfrøðiliga bindandi, so er og verður samstarvið karmur um týdningarmiklar og varandi avgerðir. Avgerðir, ið eisini fáa týdning fyri framtíðarmenning av føroyska samfelagnum.

## Sendinevndin

### Denmark/Greenland/Faroe Islands og hvussu virksemið í Arktiska Ráðnum er skipað



Sendinevndin eitur „Denmark/ Greenland/Faroe Islands“. Flaggað verður við øllum trimum fløggum. Leiðarin fyri sendinevndina á SAO-fundum er umboð fyri danska uttanríkisráðið.

Limalondini skiftast at hava formansskapin í Arktiska Ráðnum í eitt tvey ára tíðarskeið, ið endar við einum ráðharrafundi. Ráðharrafundurin samtykkir eina yvirlýsing, ið hevur til endamáls at lýsa politisku raðfestingarnar í arktiska samstarvinum. Tey árini, tá ið eingin ráðharrafundur er, er ístaðin fundur fyri vararáðharrar ella embætisfólk á hægsta stigi.

Ein fastur embætismannabólkur við umboðum á uttanríkispolitiskum stigi, SAO – Senior Arctic Officials – heldur formligan fund tvær ferðir um árið. Endamálið við fundunum er at leiðbeina arbeiðið hjá arbeiðsbólkunum og fyrireika mál og virkisætlanir til politiska viðgerð á ráðharrafundunum.



*SAO fundur í Stokkhólmi mars 2013. Mynd: Arctic Council Secretariat.*

At Føroyar luttaka í arktiska samstarvinum er sostatt ein natúrligur liður í millumtjóðaavirksemi Føroya, sum eisini fevnir um samstarv millum Norðurlond, í útnorðri og tvørtur um Atlantshav. Síðan 1998 hava Føroyar verið partur av donsku sendinevndini í Arktiska Ráðnum saman við Danmark og Grønlandi.

Føroyar hava nógv til felags við hini samfeløgini í Arktis, serliga hvat ið viðvíkur búskapargrundarlagi, nærleika við náttúruna, mentan og avbjóðingar í sambandi við at tryggja fólkavøkstur og burðardygga menning.

## Føroyar í Arktiska Ráðnum

Í mun til annað økisbundið millumtjóðasamstarv, har ið Føroyar annaðhvørt eru umboðaðar í egnum navni ella saman við Grønlandi, eru Føroyar í Arktiska Ráðnum partur av eini tríbýttari sendinevnd saman við Danmark og Grønlandi. Í sendinevndini verður stórur dentur lagdur á, at allir tríggir partar eru sjónligir við, at øll londini verða nevnd og øll trý fløggini umboðað. Semja skal vera millum Danmark, Føroyar og Grønland um, hvørji sjónarmið sendinevndin skal bera fram.

Flestu evnini, sum verða viðgjørd í Arktiska Ráðnum, eru málsøki, sum Føroyar hava ræði á. Tí er tað sera umráðandi at tryggja, at Føroyar eru við til at orða og menna avgerðirnar, sum verða tiknar í Arktiska Ráðnum, so tær eru hóskandi fyri føroysk viðurskifti. Ein avgerandi liður í hesum er, at arbeiðsgongdin í donsku sendinevndini er skipað á ein hátt, so at sjónarmiðini hjá øllum trimum londum verða hoyrd, hóast londini hava ymiskar fortreytir og raðfestingar.

## Miðvís raðfesting neyðug

Sera nógv fundarvirksemi er á embætisstigi í Arktiska Ráðnum. Hetta kann vera ein tung byrða fyri eina lítla fyrisiting sum ta føroysku. Harafturat eru tað ikki øll evni, ið verða viðgjørd í Arktiska Ráðnum, sum hava beinleiðis týdning fyri Føroyar. Skulu Føroyar fáa sum mest burtur úr arktiska samstarvinum, er tað avgerandi við miðvísari raðfesting av luttøkuni, og at neyðug orka verður sett av.

Føroyar eiga harafturat at virka fyri einari munadyggari skipan av arktiska samstarvinum, sum ger tað lættari og smidligari hjá smáu londunum og samfeløgunum, sum hava heimstað á arktiska økinum at luttaka á fullgóðan hátt í samstarvinum.

Tað er í stóran mun í arbeiðsbólkunum, at frágreiðingar og leiðreglur verða greiddar úr hondum, og at uppskot koma um, hvørji ítøkilig samstarvsøki eiga at verða raðfest. Føroyska luttøkan er misjøvn og ymisk frá arbeiðsbólki til arbeiðsbólk. Støðug luttøka í teimum mest viðkomandi arbeiðsbólkunum eigur at verða raðfest, og neyðug arbeiðsorka og fígging sett av. Tað snýr seg serliga um arbeiðsbólkarnar AMAP, CAFF, PAME og SDWG.

Luttøka í hesum bólkum er sera gott høvi hjá Føroyum at gera vart við síni sjónarmið og at knýta faklig sambond við onnur lond og felagsskapir um mál, ið hava týdning fyri Føroyar. Slík luttøka eigur tískil at vera raðfest eins høgt og fundirnir á embætisstigi.

## At menna samstarv við grannalond og onnur

Tað er av stórum týdningi, at støðugt verður virkað fyri at Føroyar eru sjónligar í arktiskum høpi, – bæði fyri at tryggja, at føroysk sjónarmið verða hoyrd og fyri at tryggja, at Føroyar fáa bestu møguleikar at bjóða fram sína serfrøði og tænastur.

Føroyar eiga serliga at raðfesta og styrkja samskifti og samstarv við lond og felagsskapir, sum hava felags áhugamál og avbjóðingar í sambandi við stóru broytingarnar, sum fara fram í Arktis. Sum lítið land fáa Føroyar mest burtur úr at røkja sambond við fleiri lond. Tí er umráðandi, at Føroyar gagnnýta allar møguleikar, ið felagsskapir og samstarv, sum Føroyar luttaka í, kunnu geva og á hendan hátt tryggja, at føroysk sjónarmið verða hoyrd.

Virkast skal fyri einum støðugum samskifti við grannarnar í útnorðri. Vit hava í dag eitt tætt og virkið politiskt samstarv við Grønland, Ísland og Noregi á nógvum ymsum økjum, t.d. í sambandi við tingmannasamstarvið í Útnorðurráðnum og Norðuratlantiska nevndin fyri havsúgdýr NAMMCO (North Atlantic Marine Mammal Commission), har ið eisini arktisku limalondini Kanada og Russland luttaka sum eygleiðarar. Harafturat eigur beinleiðis sambandið við Russland, USA og Kanada at verða styrkt.

Fleiri av upprunafólkunum í Arktiska Ráðnum hava felags áhuga-

## Arbeiðsbólkarnir í Arktiska Ráðnum

Seks arbeiðsbólkar eru í Arktiska Ráðnum, og teir eru mannaðir við serfrøðingum úr limalondunum. Føroyskir serfrøðingar luttaka í teimum flestu av arbeiðsbólkunum. Arbeiðsbólkarnir standa fyri flestu frágreiðingunum og støðulýsingunum, sum verða gjørdar í Arktiska Ráðnum. Hvør arbeiðsbólkur hevur egið stýri og egna skrivstovu. Skrivstovurnar eru í limalondum og eru í høvuðsheitum fíggjaðar av vertslandinum.

**AMAP** – Arctic Monitoring and Assessment Programme arbeiðir serliga við at gera samanberiligar lýsingar av útbreiðsluni av umhvørviseitrandi evnum í arktisku náttúruni, og hvørji árin umhvørvisdálkingin hevur á fólkaheilsuna hjá teimum, ið búgva á arktiska økinum.

**CAFF** – Conservation of Arctic Flora and Fauna-samstarvið snýr seg fyrst og fremst um at kortleggja og varðveita lívfrøðiligt margfeldi í Arktis.

**PAME** – Protection of the Arctic Marine Environment-samstarvið snýr seg um at verja arktiska havumhvørvið. Mett verður um, hvørt verandi millumtjóðasáttmálar eru nøktandi, og tilmæli verða gjørd um, hvat kann betra um umsitingina av arktiska havumhvørvinum.

**EPPR** – Emergency Prevention, Preparedness and Response veitir kunnleika um fyribyrging og tilbúgving í sambandi við umhvørvisvanlukkur í Arktis. Virksemið snýr seg serliga um avbjóðingar viðvíkjandi tilbúgving á økjum við ísi og hevur tískil higartil ikki verið so viðkomandi fyri Føroyar.

**SDWG** – Sustainable Development Working Group arbeiðir fyri á burðardyggan hátt at verja og styrkja búskaparligu støðuna, mentanina og heilsuna hjá fólkunum í Arktis.

**ACAP** – Arctic Contaminants Action Program virkar fyri at minka útlátið av dálkingarevnum í arktisku náttúruni og at fremja millumtjóðasamstarv á arktiska økinum. Virksemið snýr seg fyrst og fremst um dálking í Russlandi. Av somu orsøk hevur føroysk luttøka ikki verið í hesum arbeiðsbólki.

## Felagsskapir fyri upprunafólk

Seks felagsskapir fyri upprunafólk eru fastir luttakarar í Arktiska Ráðnum. Felagsskapirnir luttaka á jøvnum føti við limalondini í orðaskiftinum. Tó eru teir ikki við til at taka formligar avgerðir í ráðnum.

Felagsskapirnir eru: Inuit Circumpolar Council, Saami Council, Russian Arctic Indigenous Peoples of the North, Aleut International Association, Arctic Athabaskan Council og Gwich´in Council International.

INUIT

Gwich'in Council International

mál og avbjóðingar, hvat ið viðvíkur gagnnýtslu av havtilfeingi. Tað er tí týdningarmikið at røkja hesi felags áhugamál og finna felags stev fyri at tryggja, at fólkini í Arktis og rættindi okkara til burðardygga menning verða verandi høvuðsmálið í øllum liðum í samstarvinum.

Í juni 2012 legði ES-nevndin fram eitt uppskot til nýggjan ES-politikk um Arktis. Tað var gjørt fyri at stuðla upp undir vaksandi politiskan og vinnuligan áhuga í Evropa fyri samstarvi í Arktis. Uppskotið leggur stóran dent á, hvat ið ES hevur at bjóða sum samstarvspartur í Arktis, við m.a. at vísa á evropeiska íkastið til gransking í arktiskum viðurskiftum. Tað hevur stóran týdning at tryggja, at Føroyar verða havdar í huga, tá ið samstarv í Arktis er til viðgerðar í ES-høpi. Í arktisku heildarætlanini hjá Kongsríkinum verður dentur lagdur á at gera øll trý londini sjónlig fyri útheiminum, eitt nú í ES-høpi, har ið m.a. Danmark sum ES limaland skal virka fyri, at tilvitanin um arktiska leiklutin hjá Føroyum verður styrkt.

Ein felagsskapur, har ið Føroyar higartil ikki hava havt beinleiðis umboðan, er tingmannasamstarvið um Arktis SCPAR (Standing Committee of Arctic Parliament-arians). SCPAR er eitt tingmanna-samstarv um Arktis, sum varð stovnað í 1994 við tí endamáli at arbeiða fyri, at Arktiska Ráðið varð stovnað. Síðan Arktiska Ráðið varð sett á stovn í 1996, hevur nevndin arbeitt fyri at fremja arbeiðið í Arktiska Ráðnum. Annaðhvørt ár verður skipað fyri eini ráðstevnu fyri tingfólk úr arktisku londunum og ES-tinginum. Á ráðstevnuni verður ein yvirlýsing samtykt við tilmælum til Arktiska Ráðið, arktisku londini og ES-nevndina. Næsta ráðstevnan verður í ES-tinginum 13. til 15. september 2013.

Ein av grønlendsku fólkatings-limunum er umboð fyri Danmark/ Grønland. Føroyar hava ikki limaskap í SCPAR. Sum limir í Útnorðurráðnum, sum er eygleiðari í SCPAR, hava føroyskir tinglimir tó stundum luttikið á fundum í SCPAR. Løgtingið eigur at virka fyri at fáa føroyska umboðan í SCPAR.

Eisini ber til á annan hátt at gera vart við føroyska serfrøði og før-oysk sjónarmið í arktiskum høpi. Ein ørgrynna av ráðstevnum verða hildnar um arktisk viðurskifti, ið m.a. snúgva seg um geopolitisk- og samfelagsviðurskifti, um vinnuligt virksemi, gransking og mentan. Tí er tað av stórum týdningi at tryggja, at føroyskir serfrøðingar eru umboðaðir á tílíkum ráðstevnum. Harafturat eigur at verða gjørt meira kunningartilfar á enskum um Føroyar og føroysk áhugamál.

## Norðurlendskt samstarv um Arktis

Í Norðurlendska Ráðharraráðnum er Arktis eisini komið á breddan. Fyri kortum varð ein arbeiðsbólkur settur, ið Føroyar eisini eru við í. Hesin arbeiðsbólkur skal arbeiða við Arktis sum eitt av høgt raðfestu evnunum í nýggju sam-starvsskránni fyri 2013-2016. Har-umframt hevur Norðurlendska Ráðharraráðið orðað eina arktiska samstarvsætlan. Málið er at stuðla og fremja samfelags- og búskap-armenning á arktiska økinum við atliti at fólki og umhvørvi.

Til hetta endamál hevur Norður-lendska Ráðharraráðið sett eina nevnd, sum ber heitið Nordisk Rådgiviningskomitée for Arktis. Nevndin er mannað av norðurlendsku umboðunum á embætismannastigi í Arktiska Ráðnum, og Føroyar hava eina virkna luttøku í hesari nevnd. Uppgávan hjá nevndini er fyrst og fremst at viðgera umsóknir um stuðul til norðurlendskar verkætlanir um arktisk viðurskifti. Upphæddin til stuðul í 2013 var góðar 6 mió. kr. Fleiri føroyskar verkætlanir hava fingið ágóðan av hesum stuðli. Á www.norden.org kann lesast meira um evnið.

Harumframt er NORA, sum hevur høvuðssæti í Tórshavn, sera virkið í arktiska økinum.


Løgmaður saman við starvsfeløgum á arktiska ráðharrafundinum í Nuuk í 2011.


Mynd: Kimberley Coole

## TILMÆLI

Mælt verður til:

- Miðvíst at raðfesta luttøku í Arktiska Ráðnum, íroknað í øllum viðkomandi arbeiðsbólkum.
- At arbeiða fyri einari munadyggari skipan av arktiska samstarvinum, so smáu londini og samfeløgini, sum hava heim-stað á arktiska økinum, kunnu luttaka á fullgóðan hátt.
- At virka fyri, at arbeiðsgongdin í donsku sendinevndini er skipað á ein hátt, so at sjónarmiðini hjá øllum trimum londum verða hoyrd.
- Røkja og menna eitt felags stev við londini í útnorðuri um arktiska samstarvið.
- At brúka luttøkuna í Arktiska Ráðnum til at styrkja beinleiðis samstarv og samskifti við øll limalondini, felagsskapirnar fyri upprunafólk og eygleiðarnar.
- At virka fyri, at Føroyar gerast partur av tingmannasamstarvinum um Arktis SCPAR.
- At gera vart við føroyska serfrøði og føroysk sjónarmið í arktiskum høpi, m.a. við at luttaka á viðkomandi ráðstevnum um arktisk viðurskifti. Harumframt eigur at verða gjørt meira kunningartilfar á enskum um Føroyar og føroysk áhugamál.

# Føroyar á landnyrðingsleiðini

Føroyingar hava drúgvar royndir at sigla norðarlaga í norðurhøvum, og føroysk virki hava royndir at byggja, umvæla og gera út skip, ið sigla og fiska á norðurleiðum. Føroyskar havnir hava eisini í nógv ár veitt tænastur til útlendsk skip.

Føroyar liggja væl fyri á landnyrðingsleiðini og eiga at nýta henda møguleika at bjóða seg fram sum tænastu- og umskipingarhavn.

Flestallar skipatænastur fáast í Føroyum. Fyritøkur hava førleikar, umstøður og hóskandi goymslur. Ein avbjóðing er tó, at fyritøkurnar eru smáar, og uppgávurnar stórar og fjølbroyttar. Neyðugt er tí at samstarva og samskipa virksemið fyri harvið at kunna veita skipum alt, sum teimum tørvar. Nevnast kunnu mekaniskar umvælingar, útgerð og proviant, umstøður at skifta manning, heilsutænastur og skeiðsvirksemi í t.d. trygd, heilsulæru og vandamiklum farmi.

## Ein tænastudepil í Norðurhøvum

Sambært samgonguskjalinum skal ein ætlan gerast fyri, hvussu Føroyar kunnu bjóða seg fram at gerast ein altjóða sjóvinnu-, tænastu- og útbúgvingardepil. Uppgávan liggur hjá Vinnumálaráðnum.

Uttanríkistænastan skipaði í november 2012 fyri verkstovuni „Vinnuligir møguleikar í Arktis“. Ein av høvuðsniðurstøðunum var, at Føroyar eiga at menna seg sum tænastudepil í norðurhøvum. Umboð fyri vinnuna hava í hesum sambandi tikið stig til at skipa eitt samstarv um ein slíkan tænastudepil. Depilin skal vera opin fyri øllum fyritøkum, ið lúka tey felags góðskukrøv, ið verða sett, og sum megna at halda seg á einum javnt høgum stigi. Endamálið við samstarvinum er at kunna veita skjóta og góða tænastu til fiskivinnu, oljuvinnu og frálandsvinnu, og aðrar veitingar avleiddar av hesum virksemi.

Samstarvið er kjølfest í Vinnuhúsinum, og arbeitt verður við at gera uppskot til, hvørji krøv luttakandi fyritøkurnar skulu lúka. Átakið samtykkir væl við ætlanina hjá landsstýrinum um at menna Føroyar sum ein altjóða sjóvinnu-, tænastu- og útbúgvingardepil. Vinnumálaráðið hevur ein leiklut í hesum samstarvi saman við nógvum øðrum almennum myndugleikum, m.a. Sjóvinnustýrinum, FAS, Uttanríkistænastuni, Fíggjarmálaráðnum, Mentamálaráðnum, Heilsumálaráðnum o.s.fr.



*Mynd: Alessio Mesiano*




*Mynd: The Arctic Institute*

### Útnyrðingsleiðin

Leiðin norður um Kanada er opin partar av summarhálvuni. Tað er tó ikki politisk undirtøka í Kanada fyri at nýta leiðina á sama hátt sum í Russlandi. Umhvørvisfyrilit og trygd viga tungt í hesum sambandi. USA metir, at hetta er altjóðasjógvur og streingir á, at leiðin verður latin upp. Eygleiðarar vænta tó ikki, at leiðin gerst ein týðandi siglingarleið í arktiskum høpi í bræði. Staðbundna skipaferðslan á økinum fer tó væntandi at økjast munandi.

### Miðleiðin

Miðleiðin, ið er leiðin frá Kyrrahavi tvørtur um Norðpólin til Norðuratlantshav, er ikki ísfrí enn. Kinverjar eru sera áhugaðir í hesari leið og vænta, at tað fer at bera til at sigla eftir hesari leið longu í 2020 – fýra mánaðir um árið. Hildið verður, at tað verður gjørligt at flyta 10 prosent av árliga vøruflutninginum úr Kina til Evropa eftir miðleiðini hesar mánaðir.

### Landnyrðingsleiðin

Siglingarleiðin fyri norðan varð ment í Sovjet-tíðini til at vera ein týdningarmikil siglingarleið fyri sjóvegis flutningi í Arktis. Skipaferðslan er økt støðugt norður um Russland seinnu árini. Russland hevur lagt nógva orku í at bjóða landnyrðingsleiðina fram sum ein valmøguleiki til Suezveitina. Sum ein liður í at marknaðarføra leiðina og at gera treytirnar smidligari, boðaði Russland í januar 2013 frá, at tað nú er gjørligt at sigla eftir hesari leið uttan russisk kjarnorkuísbrótarafylgiskip. Samstundis verður sagt, at tað verður gjørligt – tá ið umstøðurnar loyva tí – at nýta skip, ið ikki eru serliga gjørd til at sigla í íssjógvi.

Hetta er tó ein trupul og vandamikil sjóleið, har ið tað oftast er neyðugt at fáa hjálp frá einum ísbrótara. Skipini muga vera sterk og skikkað til slíkar umstøður. Í løtuni kann leiðin bert nýtast millum juli og november. Umframt skiftandi ísviðurskifti, ið kunnu hava við sær seinkingar, eru onnur viðurskifti, ið gera seg galdandi. Nevnast kunnu vantandi trygd og tilbúgving, atgongd at havnum, samskifti, eygleiðing o.s.fr.

Russland roynir støðugt at menna leiðina og hevur boðað frá, at ætlanin er at byggja tíggju neyðstøðuhavnir fram við landnyrðingsleiðini. Landnyrðingsleiðin væntast at fáa stóran týdning komandi árini. Mett verður, at tað í fyrstu atløgu serliga verður komandi náms- og ráevnisvinnan í Arktis, ið fer at brúka landnyrðingsleiðina at sigla kolvetni og farm til og frá Arktis.



*Mynd: Absalon Hansen*

Neyðugt er at gera neyvar kanningar, áðrenn stórar íløgur verða gjørdar í útbyggingar. Fleiri eru um boðið í kappingini um øktu skipaferðsluna. Russland fer at leggja seg eftir hesari vinnugrein, og harumframt liggja íslendingar framvið. Íslendingar eru serliga áhugaðir í komandi kinesiska flutninginum ígjøgnum miðleiðina og hava í hesum sambandi ítøkiligar ætlanir um at gera eina altjóða vøru- ella umskipingarhavn. Tí eigur tørvurin á m.ø. einari umskipingarhavn at verða viðgjørdur í sambandi við eini ætlan at menna Føroyar sum sjóvinnu- og tænastudepil. Lýsast skal eisini, hvørjir kappingarneytarnir eru, hvørji skipasløg eru og hvør farmur kann umskipast í Føroyum.

### Styrkja grundarlagið undir Føroyum sum tænastudepli

Tað hevur stóran týdning, at starvsfólk eru at loysa neyðugu uppgávurnar. Tí er týdningarmikið, at lærlingar verða settir við, og at viðkomandi vinnuútbúgvingar verða raðfestar, t.d. í logistikki, farmaflutningi og tænastuyrkinum sum heild. Yrkisútbúgvingar og eftirútbúgving av hesum fakbólkum eiga somuleiðis at verða raðfestar.

Tað er ein stór samfelagslig avbjóðing, at sera nógv dugnalig arbeiðsmegi fer av landinum at arbeiða fyri útlendskar fyritøkur. Serskipanir við frádrátti og stuðulsskipanum til fólk, ið starvast uttanlands, gera tað torført hjá føroyskum vinnulívi at kappast við útlendskt vinnulív um arbeiðsmegina. Í staðin áttu føroyskar fyritøkur at kunna bjóða seg fram at loysa somu uppgávur við somu starvsfólkum. Skal tað lata seg gera, vísir vinnan á, er neyðugt at gera tillagingar í skattalóggávuni við tí í hyggju, at føroyskar fyritøkur ikki eru fyri kappingaravlaging mótvegis fyritøkum í grannalondunum.

Støddin á fyritøkunum hevur eisini týdning, og her eigur almenni myndugleikin at samstarva við vinnuna fyri at stimbra fyritøkurnar til at menna seg og at bjóða seg fram, m.a. við at marknaðarføra føroyska vinnu úteftir.

### Føroysk ferðavinna í Arktis

Ferðavinnan í Arktis er ein vinna í vøkstri. Talið á ferðafólkaskipum á arktiska økinum økist alsamt, og í Føroyum hevur talið á ferðafólkaskipum ligið um 50 skip seinnu árini. Ferðamálið Arktis verður selt sum tann nýggi, ókendi 'heimsparturin'. Leitanin eftir tí ókenda, óspilta og upprunaliga er ein drivmegi, og her kunnu Føroyar luttaka í kappingini sum partur av arktisku farleiðini. Aðrir marknaðir hava eisini týdning í arktiskum høpi, sum t.d. vinnuferðavinna við fyriskipan av fundum, ráðstevnum og tiltøkum.

Ein hópur av ráðstevnum og tiltøkum um arktisk viðurskifti verður longu fyriskipaður í londum kring okkum. Her kunnu Føroyar við fyrimuni bjóða seg fram sum ein serstakur partur av Arktis við serstakliga góðum kørmum og kunnleika til at skipa fyri slíkum virksemi. Ferðaráð Føroya fer frameftir at leggja stóran dent á at bjóða Føroyar fram til slíka ferðavinnu.

### Ráevnisvinna í Grønlandi

Veðurlagsbroytingarnar hava við sær, at fleiri nýggj øki verða atkomilig fyri ráevnisvinnu í Grønlandi. Samstundis økist eftirspurningurin eftir hesum evnum alsamt. Umheimurin sýnir tí stóra olju- og gassríkidøminum í Grønlandi miklan ans.

Fleiri feløg eru farin undir at gera fyrireikingar í Grønlandi. Ítøkiligar ætlanir eru um risaverkætlanir, har ið brúk er fyri nógvum serkunnleika. Tað eru serliga ensk-amerikonsk orku- og tilfeingisfeløg, ið standa á odda fyri stóru verkætlanunum. Aftur at hesum eru feløg, ið hava arbeiðsorku, tøkni og vitan, ið krevst til at fremja verkætlanirnar. Triðja liðið er undirveitararnir, ið hava serkunnleika og royndir á arbeiðsøkinum.

Í løtuni eru tað í høvuðsheitum grønlendsk, norsk og íslendsk feløg, ið hava boðið seg fram sum undirveitarar við serkunnleika til at arbeiða í Grønlandi.

Mett verður, at stórur tørvur verður á undirveitarum komandi árini, bæði við atliti at olju- og námsvinnu.

### Oljuvinna

Veðurlagsbroytingarnar hava við sær, at sjóøki í Grønlandi, Barentshavi og Karahavi, umframt í høvunum út fyri Alaska og Kanada, eru vorðin ísfrí støðugt størri partar av árinum. Atgongdin at fjaldu oljuog gassgoymslunum í Arktis er tó sera ymisk. Nøkur øki eru lættari at koma framat, meðan onnur verða torfør at koma framat í mong ár frameftir.

### Føroysk luttøka í altjóða oljuvinnu

Føroyingar eru virknir í altjóða oljuvinnuni gjøgnum bæði føroysk oljufeløg og veitingarfeløg. Føroysk feløg, ið veita tænastur í sambandi við veitingar og vaktarskip, loftvegis flutning og útvegan av arbeiðsmegi, eru í ferð við at staðfesta seg sum veitarar hjá norskum olju- og gassleitingum í Arktis.

Stórur áhugi er fyri at leita eftir olju í Vesturgrønlandi, og roknast kann við, at nøkur av teimum stóru feløgunum fara at bora næstu árini. Í Eysturgrønlandi er øðrvísi, tí tað er eitt nógv torførari øki at arbeiða á. Roknað verður ikki við boringum har tey nógvu komandi árini.

Sum støðan er í dag, kann ikki roknast við, at føroysk oljufeløg fara at vera partur av oljuleitingini í Vesturgrønlandi í bræði, og als ikki í Eysturgrønlandi.

Føroyar liva í samljóði við náttúruna kring okkum og av livandi náttúrutilfeingi okkara. Sum virkin partur í arktiska samstarvinum eigur tað at vera eitt aðalmál at vera við til at tryggja, at kolvetni í arktisku undirgrundini verða troytt burðardygt og við fyriliti fyri umhvørvinum.

### Føroysku oljufeløgini og frálandsreiðaríini

Samstundis sum leitað verður eftir olju, og nýggjar leiðir verða útbygdar í okkara parti av Arktis, er

## Áhugin fyri oljuleiting í Arktis

Tað eru serstakliga tríggjar høvuðsorsakir til, at áhugin fyri oljuleiting og framleiðslu í Arktis er vorðin so stórur. Fyri tað fyrsta er tað stóri altjóða eftirspurningurin eftir kolvetni. Metingar siga, at eftirspurningurin fer at vaksa við 30 prosentum til 2040.

Harnæst eru tað veðurlagsbroytingarnar, sum skapa nýggjar møguleikar.

Loksins, og ikki minst, eru tað kanningarnar hjá jarðfrøðiliga stovninum í USA, sum metir, at út ímóti 25 prosentum av heimsins fjaldu olju- og gassgoymslum finnast í undirgrundini í Arktis.

Ein onnur orsøk til vaksandi áhugan fyri Arktis er høgu oljuprísirnir, sum gera, at tað kann løna seg hjá oljufeløgunum at gera íløgur har. Ótrygg politisk viðurskifti í øðrum oljulondum hava eisini sína ávirkan.

### Framtíðarútlit

Mett verður, at umhvørvisligi váðin saman við tøkniligu avbjóðingunum, sum eru í sambandi við oljuframleiðslu í Arktis, eru truplastu spurningarnir at loysa. Fleiri av stóru oljufeløgunum, sum t.d. Shell og Statoil, halda seg vera før fyri at virka í Arktis, samstundis sum tey tryggja, at neyðug fyrilit verða havd fyri umhvørvinum. Tað eru eisini oljufeløg, sum eru beinleiðis ímóti oljuframleiðslu í Arktis, eitt nú stóra franska Total. Fleiri umhvørvisfelagsskapir eru hart ímóti at bora, tí eingin trygd er fyri, at umhvørvisvanlukkur ikki henda. Víst verður á, at oljudálking í Arktis kann gerast ein vanlukka, tí tað er nærum ómøguligt at rudda upp aftur á køldu og ísmiklu økjunum.

Men uttan mun til, hvussu stór mótstøðan enn verður, so fer leitingin og framleiðslan av gass og olju kortini neyvan at steðga. USA hevur brúk fyri oljuríkidøminum norðan fyri Alaska, og harumframt ynskir Russland at gagnnýta gassið í sjónum norðan fyri Sibiria.

Grønland hevur longu tikið avgerð um at finna grønlendsku oljuna og ger samstundis greitt, at rætturin at gagnnýta egið tilfeingi verður ikki sleptur. Eisini Noreg, ein av heimsins mest framkomnu og virdu oljutjóðum, fer við virðing fyri umhvørvi og trygd spakuliga at ota seg longri og longri norður.



Mynd: Kimberley Coole

## VINNULIG ÁHUGAMÁL OG ÆTLANIR

**Finnland** ynskir at styrkja sín leiklut sum altjóða serfrøðingur í arktiskum viðurskiftum og serkunnleika viðvíkjandi námsvinnu, sigling, skipabygging og skógarfyrisiting í Arktis. Finnland ger seg eisini til reiðar at stovna fastar umboðsstovur í grannalondunum.

**Svøríki** er í høvuðsheitum áhugað í námsvinnu, petroleum, skógarvinnu, ferðavinnu, flutningi, farmaflutningi og ísbróting á arktiska økinum og Barentsøkinum. Eisini verður handil og samstarv í sambandi við orku- og ráevnisvinnuna raðfest frammarlaga. Svøríki metir seg hava serførleikar í umhvørvisgransking og -tøkni.

**Grønland** arbeiða fyri at draga nýggjar vinnur til Grønlands og fáa til vegar íløgur til tær. Dentur verður lagdur á vinnur sum vatnorku-, náms- og ferðavinnu og at kanna møguleikarnar fyri málmvinnu, eitt nú úrvinning av mineralum, og harumframt kolvetnisvinnu úti á havi.

**Noreg** sær stórar møguleikar í nýggju siglingarleiðunum og ynskir at veita tænastur til øktu skipaferðsluna. Ætlanin er somuleiðis at lata økið við Jan Mayen upp fyri kolvetnisvirksemi. Harumframt er ætlanin at gera eina altjóða flutningsleið, ið skal knýta saman bæði jarnbreytir millum Noreg og Miðasia og havleiðir millum Noreg og Norðuramerika. Vatn-, vind- og alduorka verður eisini raðfest frammarlaga. Eitt annað serligt norskt átaksøki í arktiskum høpi er gransking.

**Russland** er eitt av mest ágrýtnu londunum í Arktis, tá ið tað snýr seg um at menna búskaparligu møguleikarnar. Vinnuáhugamálini eru serliga knýtt at ríku mongdunum av ráevnum í undirgrundini og møguleikanum fyri einari týðandi siglingarleið, ið væntandi fer at kasta nógv av sær.

**Ísland** sær møguleikar í farmaflutningi, gransking og eftirliti, t.d. í sambandi við virksemi í Eysturgrønlandi og oljukanningum í sonevnda Drekaøkinum. Ítøkiligar ætlanir eru at byggja út havnina á Langanesi, ið skal kunna taka ímóti tangaskipum, og at byggja ein altjóða flogvøll nærindis.

**USA** leggur dent á arktiska gransking, flutning, orku og umhvørvisvernd. Í **Alaska** er ætlanin at byggja eina altjóða havn, bæði til ferðavinnuskip, bjargingartænastu og tænastuveitingar í sambandi við olju- og námsvirksemi.

**Kanada** ynskir at menna loft- og havleiðirnar, so tað gerst lættari at fáa atgongd at arktiska økinum, og tað verður gjørt fyri at stimbra handils- og íløgumøguleikar. Íløgur eru gjørdar í nýggj arktisk frálandsskip og somuleiðis í Churchillhavnina í Manitoba. At menna diamantnám og ferðavinnu verður somuleiðis raðfest frammarlaga, og harumframt ynskir Kanada at bjóða vinnulívinum serfrøði og leiðbeining, tá ið leitað verður eftir mineralum og petroleum.

**Asiatisk lond** sum Kina, Japan og Suðurkorea hava víst Arktis stóran áhuga. Hesi lond kunnu fáa stórar vinnuligar og fíggjarligar fyrimunir í sambandi við nýggju siglingarleiðirnar, og harumframt atgongd at nýggjum orkumøguleikum, fiskileiðum og ráevnum.

greitt, at føroysku frálandsreiðaríini hava møguleikar at veita vørur og tænastur til framtíðarvirksemið á økinum. Tað ger seg ikki minst galdandi í Barentshavi, har virksemið fer at vinda upp á seg komandi árini.

Føroysku frálandsfeløgini, sum eru í vøkstri, eru longu partur av tænastuveitingum í GNB-økinum (Grønland, Norðurhøv og Barentshav), og Føroyar kunnu gerast útgerðar- og umskipingarstøð fyri framtíðaroljuvirksemi á hesum økinum. Nú føroyska kolvetnisvinnan stendur í vøkstri, virkar okkara politiska og landafrøðiliga støða til, at Føroyar kunnu vinna sær natúrligan lut í framtíðarvirkseminum í Arktis, serstakliga á GNB-økinum. Altjóða oljufeløg, sum eru við í leitivirksemi við Føroyar, eru eisini partur av oljuvirkseminum longri norðuri í Arktis. Hetta kann tí eisini vera eitt gott høvi til at skapa sambond og byggja brýr millum Føroyar og hini londini í Arktis.

Við atliti at tænastuveitingum til kolvetnisvinnuna í bæði Vestur- og Eysturgrønlandi eru møguleikarnir fyri føroyskari luttøku helst góðir. Menningin í føroysku frálandsvinnuni er við til at slóða fyri føroyskum veitingartænastum í grønlendsku vinnumenningini. Longu nú arbeiða føroysk veitingar- og kanningarskip í Grønlandi, eins og í Norðurhøvum. Hetta er ein ítøkiligur marknaður, og skal hann troytast, mugu vinnan og almennu Føroyar samstarva.

### Tænastuveitingar til náms- og fiskivinnuna

Tá ið námsídnaðin um ræður, er tað serliga veitingar til útbyggingar av undirstøðukervinum, ið gera seg galdandi. Her kunnu føroyskar fyritøkur, bæði byggifeløg og verkfrøðingafeløg, eisini luttaka.

Eitt øki, ið helst er serliga týðandi fyri føroyskar fyritøkur, er fiskivinnan. Her hava føroyingar drúgvar royndir, bæði við at sigla og virka í arktiskum farvatni, og at framleiða útgerð og tænastur til fiskivinnuna. Stóri altjóða áhugin fyri olju- og námsvinnuni kann hava við sær, at áhugin fyri fiskivinnuni og undirveitingar til hennara minkar. Her er sostatt góður møguleiki hjá føroyskum fyritøkum at bjóða sínar tænastur fram.

### Tilknýti til og royndir í Grønlandi

Tilknýtið til og royndirnar í Grønlandi gjøgnum mong ár kann gagnnýtast sum ein styrki hjá føroyskum vinnulívi. At bæði grønlendingar og føroyingar tosa danskt og tískil kunnu samskifta lættliga, er ein fyrimunur. Føroyskar fyritøkur eru harafturat so mikið smáar, at tær eisini hava betri fyritreytir fyri at samstarva við grønlendskar fyritøkur á jøvnum føti. Grønland er sera fjarskotið, og tað verður tí avgerandi fyri føroyskar fyritøkur at knýta samstarv við grønlendskar fyritøkur, ið hava neyðugar hentleikarnar, sum t.d. amboð, maskinur o.a.

Vinnuhúsið skipar fyri einari vinnuferð til Grønlands í apríl 2013. Slíkar ferðir eru gott høvi at marknaðarføra føroyskar fyritøkur og føroyskt vinnulív sum heild.

> Sambært Norske Veritas eru bert uml. 2.000 fólk í øllum heiminum, ið eru veruliga væl skikkað at sigla og arbeiða í Íshavinum. Helst teljast fleiri føroyingar millum hesi fólk.

## TILMÆLI

- Almenni myndugleikin eigur áhaldandi at virka fyri, at karmar verða mentir, so at føroysk vinna í frælsari altjóða kapping skapar avkast og framburð, samstundis sum trygd, trivnaður og umhvørvi verða raðfest ovarlaga.
- Tað er umráðandi, at neyðug fígging og orka verður sett av til arbeiðið at menna Føroyar sum altjóða sjóvinnu-, tænastu- og útbúgvingardepil í Norðurhøvum.
- Fyri at fáa skip at keypa tænastur í Føroyum, krevst at føroyskar fyritøkur samstarva, og at Føroyar verða miðvíst marknaðarførdar sum tænastudepil í Norðurhøvum.
- Neyðugt er, at almenni myndugleikin og privata vinnan samstarva um marknaðarføringina av føroyskari vinnu úteftir.
- Skulu tænastuvinnurnar mennast, er umráðandi, at økið verður høgt raðfest í almenna vinnu- og útflutningspolitikkinum. Eitt týdningarmikið endamál eigur at vera at fremja eina vinnumenning í mun til teir møguleikar, sum væntandi verða í arktiska økinum. Ætlanin um at stovna eitt útflutningsráð eigur at samsvara við hetta.
- Fyri at tryggja, at føroyskar fyritøkur ikki eru fyri kappingaravlaging mótvegis fyritøkum í grannalondunum, eiga viðkomandi tillagingar at verða gjørdar í sambandi við skattalóggávuna.
- Hóskandi vinnuútbúgvingar og eftirútbúgvingar eiga at verða raðfestar frammarlaga.
- Fyri at stimbra føroyskari luttøku í grønlendsku vinnumenningini er neyðugt at menna og røkja tey góðu vinnuligu og politisku sambondini landanna millum.
- Sambond við onnur viðkomandi øki eiga somuleiðis at verða ment, m.a. við vinnuferðum.



Mynd: Absalon Hansen

# Fiskiveiða í Íshavinum

At sjógvurin gerst flógvari í Arktis, og havísurin bráðnar, kann hava við sær, at nýggj sjóøki í Íshavinum gerast atkomulig fyri nýggjum fiskiskapi í framtíðini.

Broytingarnar eru sera samansettar, og tað er tí torført at meta um, júst hvat ið fer at henda. Sambært granskarum verða neyvan munandi broytingar komandi 10-50 árini viðvíkjandi vinnuligum møguleikum í fiskivinnuni. Aðrir granskarar vísa tó á, at tá ið ísurin bráðnar, og sólarljós sleppur at, kann æti mennast og vaksa sera skjótt og harvið skapa lívskor fyri nýggj fiskasløg. Seinastu árini er ísurin á økinum minkaður í alstóran mun fyri hvørt ár. Í dag verður mett, at 40 prosent av altjóða økinum í Arktis er ísfrítt um summarið. Meginparturin av Íshavinum er sera djúpt – heilt niður á 3500 metrar. Tað kann tí hugsast, at tað serliga verður fiskiskapur eftir uppsjóvarfiski, ið gerst viðkomandi, og botnfiski, har ið dýpið loyvir tí.

Føroyingar hava drúgvar royndir við fiskiskapi sera norðarlaga bæði í Grønlandi og Barentshavinum. Føroysk fiskifør fiskaðu í 2012 á 81,4 stig N á fiskiverndarøkinum norðan fyri Svalbarð. Hetta er skamt frá altjóða sjóøki í Íshavinum, og longri norðuri enn føroysk fiskifør nakrantíð hava verið áður. Mett verður, at tað eru fá onnur fiskifør, ið hava verið so norðarlaga.

## Umsiting av møguligum fiskiskapi í altjóða sjógvi í Arktis

Av tí at altjóða sjógvurin í Íshavinum altíð hevur verið undir ísi, hava ongar millumtjóðareglur fyri fiskivinnuumsiting verið ásettar. Útlitini fyri møguligum vinnuligum fiskiskapi í Íshavinum hevur elvt til orðaskifti um, hvussu økið skal umsitast í framtíðini. Óttast verður fyri, at óstýrdur fiskiskapur kann hótta viðkvomu vistskipanirnar.

Stórir partar av Íshavinum er tó innan fyri landleiðirnar hjá arktisku statunum. Harafturat gongur NEAFC-økið, sum er millum longdarstigini 42° V 51° E, heilt norður til norðurpólin. Eisini fevnir NASCO um økið. Altjóða havrættarsáttmálin UNCLOS og sáttmálin fyri ferðandi fiskastovnar eru eisini galdandi á økinum.

Eitt stórt øki er tó, ið ikki er fevnt av nøkrum fiskiveiðifelagsskapi. Samskifti um umsiting av fiskiskapi á hesum øki fer í løtuni fram millum arktisku strandarlondini. Fiskiskapur verður ikki viðgjørdur í Arktiska Ráðnum. Tað tykist ikki, at limalondini ætla at broyta hesa støðu.

USA hevur boðað frá, at ein nýggjur fiskiveiðifelagsskapur eigur at vera settur á stovn og eitt fyribils fiskiveiðibann sett í verk, til nøktandi vitan er fingin til vegar um broytingarnar á økinum. Onnur mæla til, at heimildirnar hjá NEAFC verða víðkaðar til at fevna um restina av økinum. Ábendingar eru um, at Russland, og í ávísan mun Noreg, av ymiskum orsøkum eru ivingarsom um at lýsa fiskibann á økinum. Russland er av tí fatan, at slíkt bann kann skapa altjóðarættarligar trupulleikar í sambandi við onnur lond, um einans tey fimm strandarlondini verða



Økið innanfyri reyðu strikuna er altjóða sjóøki

sáttmálapartar. Harafturat eru onnur fyrilit, ið gera seg galdandi, m.a. at tað fer at ganga rúm tíð, áðrenn sjógvurin gerst so mikið flógvur, at fiskasløg, ið hava vinnuligan áhuga, flyta seg til økið.

### Støða Føroya

Av tí at Føroyar hava drúgvar royndir í sambandi við fiskiskap sera norðarlaga, hevur tað stóran týdning, at Føroyar fylgja samráðingunum um umsiting av fiskiskapi í Íshavinum neyvt. Serliga tí tað er sannlíkt, at fiskastovnar, sum Føroyar longu nú hava søguligan áhuga í, fara at flyta seg longri norður.

Føroyar eiga at mæla frá, at ein altjóða sáttmáli, ið forðar fiskiskapi í altjóða sjógvi, verður samtyktur. Verður eitt veiðubann fyrst samtykt, verður torført at seta á stovn ein fiskiveiðifelagsskap, ið veruliga skal virka fyri at umsita fiskiskap á økinum. Føroyar eiga at tala fyri, at ein fiskiveiðifelagsskapur verður settur á stovn, har ið Føroyar verða umboðaðar.

ICES (International Council for the Exploration of the Sea) hevur orsakað av broytingunum í Íshavinum avgjørt at raðfesta kanningar á økinum. ICES er ein millumtjóðafelagsskapur, ið hevur til endamáls at samskipa havrannsóknir og at veita vísindaliga ráðgeving í fiskifrøði, fiskiskapi, havlívfrøði o.ø. í Norðuratlantshavi. Tað hevur stóran týdning, at Havstovan fylgir við í virkseminum hjá ICES í Íshavinum.

Fyri at fáa meiri vitan um sjóøkið og fiskasløgini á økinum eiga rannsóknir í Íshavinum at verða raðfestar frammarlaga, saman við flotanum, ið virkar har. Havstovan er avvarðandi myndugleiki, men játtan má fylgja við slíkari raðfesting.



Mynd: Maria Olsen

### Føroyskur fiskiskapur á norðurhøvum

1925 og frameftir:
Sluppfiskiskapur undir Grønlandi.

1930:
Fyrstu royndir við snørisfiskiskapi og troli við Bjarnoynna, Svalbarð og í Barentshavi. Serliga aftan á seinna heimsbardaga kom gongd á fiskiskapin.

1950-árini og 60-árini:
Útróður og trolarafiskiskapur í Grønlandi.

1960-árini:
Laksaveiða við Grønland

1970:
Laksaveiða norðan fyri Føroyar
1970-árini:
Rækjuveiða við Grønland.
Seinni eisini við Kanada.

### Í Norðuratlantshavi virka Føroyar í hesum økisbundnu veiðifelagsskapum

NAMMCO – North Atlantic Marine Mammal Commission er ein millumtjóðafelagsskapur fyri samstarv um at verja, umsita og granska havsúgdjór í Norðuratlantshavi. Føroyar hava egnan limaskap í NAMMCO saman við Íslandi, Noregi og Grønlandi.

NEAFC – North East Atlantic Fisheries Commission er ein millumtjóðafelagsskapur fyri samstarv um skipanir fyri fiskiskapi í altjóðasjógvi í landnyrðingspartinum av Atlantshavi.

NAFO – Northwest Atlantic Fisheries Organization er millumtjóðafelagsskapur fyri samstarv um fiskiskap í altjóða sjógvi í útnyrðingsparti av Atlantshavi.

NASCO – North Atlantic Salmon Conservation Organization er millumtjóðafelagsskapur, ið hevur ábyrgd av at umsita laksafiskiskap í Norðuratlantshavi.

Føroyar luttaka í NEAFC, NAFO og NASCO saman við Grønlandi undir heitinum Denmark in respect of the Faroe Islands and Greenland (DFG), har ið Danmark er formligi sáttmálaparturin. Danmark luttekur sum partur av ES í somu felagsskapum.

## TILMÆLI

Tað hevur stóran týdning, at Føroyar fylgja samráðingunum um at umsita fiskiskap í Íshavinum. Tað má gerast fyri at tryggja rættindi til ein møguligan fiskiskap á nýggjum leiðum í Íshavinum, tá ið tað verður mett at vera lívfrøðiliga burðardygt. Serliga tí tað er sannlíkt, at fiskastovnar, sum Føroyar longu nú hava søguligan áhuga í, fara at flyta seg longri norður. Mælt verður til, at:

- Føroyar hava greiðan og virknan lut í nevnda millumtjóðasamskifti um at umsita ein møguligan fiskiskapi í Íshavinum, soleiðis at nýggj rættindi kunnu tryggjast á bestan hátt.
- Føroyar eiga at fylgja arbeiðinum hjá ICES á arktiska økinum. Havstovan er avvarðandi stovnur.
- Rannsóknir á arktiska økinum verða raðfestar frammarlaga saman við flotanum, ið virkar har.

# Gransking og útbúgving

**Granskingarsamstarv um arktisk viðurskifti**
Áhugin fyri at granska arktisk viðurskifti er vaksin alsamt seinastu árini. Ein hópur av altjóða granskingarverkætlanum er settur í verk fyri at kanna, hvørji árin veðurlagsbroytingar og økt vinnuligt virksemi hava á náttúruna og samfeløgini á arktiska økinum. Í Føroyum eru sera góðar fyritreytir fyri at granska havlívfrøði og veðurlagsbroytingar, sum ávirka havið, eitt nú hita, streym og súrgan. Eisini er sera viðkomandi at granska útbreiðslu og flutning av dálkingarevnum, og hvørji árin tey hava á djór og fólk.

Føroyskir granskarar hava í nógv ár luttikið í verkætlanum, og hevur tað verið bæði í arbeiðsbólkunum í Arktiska Ráðnum og í øðrum arktiskum verkætlanum. Føroyskir granskarar vísa á, at viðurskiftini, lívskorini og sambandið við náttúruna eru rættiliga lík í samfeløgunum í Arktis. Hetta merkir, at vit í arktiskum høpi hava nógvar eyðsæddar samstarvsmøguleikar og skyldur.

Eisini vísa granskararnir á, at luttøka í slíkum verkætlanum gevur góðan møguleika fyri at menna kunnleika um føroysk viðurskifti og seta viðurskiftini í ein millumtjóðasamanhang. Á hendan hátt verða Føroyar og føroysk viðurskifti sjónlig í heimssamfelagnum, samstundis sum kunnleiki um føroysk viðurskifti verður mentur. Luttøka í arktiskum verkætlanum hevur havt við sær, at møguligt hevur verið at fáa fíggjarligan stuðul frá eitt nú DANCEA og Norðurlendska Ráðharraráðnum.

Føroyska luttøkan í arbeiðsbólkum í Arktiska Ráðnum hevur fevnt sera víða frá samstarvi um plantur, sjófugl, geislavirkni, havfrøði og fólkaheilsu til umhvørvisdálking.

**Føroysk luttøka**
Sum dømi um føroyska luttøku í granskingarsamstarvi í Arktiska Ráðnum kann nevnast, at Umhvørvisstovan hevur kannað innihaldið av tungmetalum og POPs í føroysku náttúruni. Úrslitini av kanningunum geva eina mynd av dálkingini í føroyska umhvørvinum og kunnu nýtast til at bera saman við støðuna aðrastaðni. Harafturat kunnu kanningarnar geva ábendingar um, hvussu dálkingin broytist við tíðini.

Sum dømi um aðra føroyska luttøku í granskingarsamstarvi um arktisk viðurskifti kann nevnast FP7-verkætlanin North Atlantic Climate (NACLIM), sum Havstovan luttekur í. Endamálið við verkætlanini er at kanna, um tað ber til at gera forsagnir um havveðurlagið (vatnskorpuhita o.a.) í Norðuratlantshavi. Um tað ber til, fara hesar kanningar síðan at gera tað møguligt at gera forsagnir um broytingar í vistskipanum í Norðuratlantshavi, serliga við atliti at uppsjóvarfiski. Tilsamans seytjan granskingarstovnar úr níggju evropeiskum londum eru við í hesi verkætlan.

Eisini er Jarðfeingi partur av NAG-TEC (Northeast Atlantic Geoscience Tectonostratigraphic Atlas)-verkætlanini, sum arbeiðir við at greiða úr hondum eitt nágreiniligt jarðfrøðiligt kort og eina lýsing, ið m.a. skal betra um vitanarstigið undir oljuleiting í Norðuratlantshavi. Verkætlanin er úrslit av einum samstarvi millum Jarðfeingi og sjey aðrar norðurevropeiskar jarðvísindastovnar.

Jarðriv (erosión) er ein trupulleiki, sum ger seg galdandi kring arktiska økið, eisini í Føroyum. Jarðfeingi luttekur í granskingarverkætlan, ið er fíggjað av Norðurlendska Ráðharraráðnum, um jarðrivsviðurskiftini í Grønlandi, Íslandi, Føroyum, Noregi, Svøríki og Finnlandi.



*Mynd: Martin Sirkovsky*

**Útbúgving sum grundarlag**
Fortreytin fyri at luttaka í millumtjóðagranskingarsamstarvi er tann, at vit hava fólk við viðkomandi útbúgvingum. Føroyar eru ov lítlar til at veita allar hugsandi útbúgvingar. Tí er neyðugt at meta um og raðfesta tey útbúgvingartilboð, sum sampakka við avbjóðingarnar í komandi tíðum. Í einum lítlum samfelag sum tí føroyska er tað harafturat sera týdningarmikið, at útbúgvingarstovnarnir hava møguleika at mennast og at samstarva við útbúgvingarstovnar uttanlands.

Miðnámsskúlarnir í Føroyum geva hóskandi grundarlag fyri framhaldslestri sum heild, og harumframt veita yrkisútbúgvingar góðar førleikar til vinnuna.

Í sambandi við hægri lestur eru fleiri útbúgvingar, ið eru viðkomandi, tá ið tað snýr seg um útbúgvingarsamstarv um arktisk viðurskifti; t.d. lívfrøði, samfelagsvísindi og sjóvinnuútbúgvingar.

Fróðskaparsetur Føroya luttekur í ymsum millumtjóðaútbúgvingarsamstarvi í arktiskum høpi. Fyrimunurin við hesum samstarvi er felags útgangsstøði viðvíkjandi fólki og serfrøðingum, sum hava holla vitan um viðkomandi viðurskifti av felags áhuga fyri londini kring arktiska økið.

Joint Master's útbúgving í sjóvistskipanum og veðurlagi er útbúgvingarsamstarv, har ið Fróðskaparsetur Føroya luttekur saman við universitetunum í Bergen, Aarhus og Íslandi. Útbúgvingin leggur dent á at menna vitan, førleikar og nýhugsan í sambandi við viðurskifti í sjónum. Lesandi kunnu taka ymiskar partar av útbúgvingini í luttakandi londunum.

Harafturat byrjar Joint Master's útbúgving í burðardyggari umsiting í 2014. Hetta er eitt samstarv millum Fróðskaparsetur Føroya og universitetini í Reykjavík, Akureyri, Nuuk og Bodø. Útbúgvingin fevnir um lærugreinir, sum t.d. landafrøði, umsiting, altjóða viðurskifti, løgfrøði, søgu, mannfrøði, búskap og samskifti.

Universitetið í Akureyri bjóðar útbúgving í pólløgfrøði. Fróðskaparsetrið luttekur eisini her.

Stavanger Offshore Tekniske Skole, Verkmenntaskólinn á Akureyri, Greenland School of Minerals and Petroleum í Sisimiut og Vinnuháskúlin í Føroyum hava stovnað útbúgvingarsamstarvið FING. Útbúgvingin, sum helst verður klár í 2014, fevnir um lærugreinir, sum verða settar saman á nýggjan hátt. Endamálið er at menna útbúgvingar um m.a. kolvetnisevni, trygd og umhvørvi.

Arktiska Universitetið (UArctic) er eitt netverk av hægri lærustovnum, miðnámsútbúgvingum og gransking í Arktis. Stovnar, sum eru limir, gagnnýta tilfeingi, umstøður og serkunnleika hvør hjá øðrum til at byggja viðkomandi útbúgvingarskipanir. Fróðskaparsetur Føroya hevur ætlanir um at menna samstarv um

útbúgvingar á økjum sum fiskivinnu, aling og vistfrøði.

Fjarlestur gerst alsamt meira vanligur og viðurkendur undirvísingarháttur, og er tað í serligan mun týdningarmikil í arktiskum høpi. Tøknin er í støðugari menning, og tað hevur týdning, at hesin møguleiki verður gagnnýttur væl, tí tað snýr seg bæði um at sleppa fram at týdningarmiklari vitan og samstarvi, samstundis sum hetta er ein bíligur samskiftisháttur, tá ið fyrstu íløgurnar eru gjørdar.

### Møguleikar fyri menning

Talið á granskarum í Føroyum er ikki stórt í altjóða granskingar- og útbúgvingarhøpi. Tað hevur tí stóran týdning, at føroysk serfrøði fær hølvi at luttaka í viðkomandi fakligum granskingarnetverkum og samstarvi.

Stóri altjóða áhugin fyri arktiskum viðurskiftum hevur við sær, at nógvir møguleikar eru fyri samstarvi í sambandi við gransking á økinum. Harafturat hava umfatandi broytingarnar á økinum við sær, at stórur tørvur er á vitan og serfrøðingum við hollum innliti í staðbundin viðurskifti.

Góðir granskingarførleikar og góð grundvitan um náttúru, heilsu og samfelagsviðurskifti gera Føroyar virðismiklar sum felagar í altjóða granskaranetverkum og granskingarverkætlanum. Fyri at menna eina nøktandi grundvitan krevst, at hóskandi íløgur verða gjørdar í viðurskifti, sum hava serligan føroyskan áhuga, og sum fígging ikki fæst til uttanlands.

Áhugin fyri at koma til Føroya at granska í arktiskum sambandi er eisini stórur. Við at kunna um møguleikarnar og við at seta í verk skipanir, sum kunnu eggja og gera tað lættari at koma higar, kundi talið á granskarum vaksið munandi komandi árini.

Nógvar verkætlanir í Arktiska Ráðnum eru týdningarmiklar í sambandi við føroysk viðurskifti. Tað krevur orku og fígging at luttaka á fundum og í slíkum granskingarverkætlanum. Tað hevur tí týdning at finna neyðuga fígging, soleiðis at føroyskir serfrøðingar kunnu taka virknan lut í altjóða granskingararbeiði.

Tá ið luttikið verður í felags granskingarverkætlanum við stuðli úr ES ella NordForsk, er aftur at eginfígging (t.d. løn og rakstur goldin av stovninum) oftast krav um lutvísa fígging úr heimlandinum afturat. Atgongd at slíkari fígging í Føroyum hevði styrkt um møguleikan at luttikið í altjóða granskingarverkætlanum, tá ið høvið býðst.

## TILMÆLI

Mælt verður til:

- At hava í huga, at ein støðug menning av føroyskum granskingarførleikum krevur eina munadygga granskingarjáttan. Raðfestingar skulu byggja á væl grundað fyrilit, soleiðis at fullur stuðul verður veittur til viðkomandi gransking, verkætlanir, samstarvsskipanir ella útbúgvingar.
- At granskingarpengar eiga at verða markaðir til verkætlanir, sum fremja samstarv millum granskarar, bæði innanlands og við granskarum uttanlands.
- At játta pening í Granskingargrunnin, sum skal vera tøkur hjá stovnum og granskarum at søkja til eginfígging, tá ið teimum stendur í boði at gerast partur av altjóða granskingarsamstarvi við partvísari útlendskari fígging.
- At kortleggja, hvar ið Føroyar eru umboðaðar í dag í mun til arktiska økið, og um vit hava møguleika at vera við aðrastaðni eisini – á politiskum, embætis- og granskarastigi. Síðan raðfesta, hvar ið vit eiga at vera við og tryggja neyðuga fígging til at luttaka virkið í hesum arbeiðsbólkum og netverkum.
- At fylgja støðugt við og kunna onnur í Føroyum, um høvi er at taka lut í verkætlanum um arktisk viðurskifti og um møguligt er at fáa fígging.
- At byggja upp og taka virknan lut í útbúgvingarsamstarvi í og um arktiska økið
- At raðfesta fjarlestur í samstarvi við partar í og um arktiska økið.


Mynd: Kimberley Coole

# Umhvørvi



Økt skipaferðsla økir eisini um smittuvanda av t.d. fiskasjúkum. Tí er neyðugt at áseta reglur um tøming og útskifting av m.ø. barlastvatni í føroyskum sjógvi. Vatnið kann innihalda skaðiligar og sjúkuelvandi verur. Verður dálkað vatn latið út í føroyskan sjógv, kann hetta hava álvarsligar avleiðingar fyri m.a. alivinnuna.

*Mynd: Alessio Mesiano*

## Umhvørvisligu áhugamál Føroya

Størsta hóttanin móti sjóumhvørvinum kring Føroyar er oljudálking frá skipum; og serliga hættislig er stór oljudálking, sum kann koma fyri millum oyggjarnar ella nær landi.

Olju- og kemikaliudálking er ein støðug hóttan móti vistskipanini í sjónum. Bæði fiskivinnan og alivinnan byggja á ta fortreyt, at vistskipanin í sjónum er so mikið rein, rík og haldfør, at hon kann endurnýggja ta lívfrøðiligu ringrás, sum er neyðug fyri at hesar vinnur skulu hava tryggar rakstrarkarmar í okkara sjóumhvørvi. Hetta er uttan mun til, um tað snýr seg um aling á firðum ella fiskiskap á nær- ella fjarleiðum.

Væntast kann, at skipaferðslan á sjóøkinum kring Føroyar fer at økjast komandi árini av øktum vinnuligum virksemi í Arktis og nýggjum siglingarleiðum har um leiðir. Økt skipaferðsla í føroyskum sjóøki saman við øktari skipaferðslu inn og úr føroyskum havnum hava við sær, at vandin fyri oljudálking veksur, bæði kring oyggjarnar og á opnum havi. At skipini alsamt gerast størri og tí lasta og bunkra ovurhonds stórar nøgdir av olju og tungolju, økir um vandan fyri stórari og ógvisligari oljudálking. Tí er neyðugt at seta tiltøk í verk at fyribyrgja dálkingarvanlukkum, t.d. at skip renna á ella reka á land.

Fyribyrgingartiltøkini, sum sipað verður til, eru í høvuðsheitum nevnd og viðgjørd í partinum um trygd og tilbúgving á sjónum, og støðan á umhvørvisøkinum, eitt nú oljutilbúgvingin, er lýst í hesum parti.

Stór olju- og kemikaliudálking á sjónum, sum rekur fyri vág og vind, kann skaða og skeikla vistskipanina í sjónum og umdømi Føroya sum fiskivinnutjóð í einum reinum og ódálkaðum sjóumhvørvi. Bestu hyggjuráðini eru tí at betra um tey tiltøk, sum kunnu byrgja fyri oljudálking á føroyskum sjóøki, og í øðrum lagi at standa tilbúgvin, tá ið óhapp kortini henda. Hetta leggur stórt trýst á føroysku oljutilbúgvingina.

## At skipa tilbúgvingina

Í lóg um umhvørvisvernd frá 1988, og í lóg um at verja sjóumhvørvið frá 2005 eru ásett krøv um útlát frá vinnuligum virksemi á landi sum á sjógvi. Við støði í lógar- og kunngerðarkrøvum skulu virki á landi og skip undir føroyskum flaggi og harumframt fremmand skip, ið eru innan fyri føroyskt sjóumveldi, lúka tær avmarkingar, sum settar eru fyri útlát av dálkingarevnum. Føroysku krøvini til skip um útlát av dálkingarevnum taka støði í og eru ájøvn við altjóðakrøv, sum sjóvinnufelagsskapurin IMO hevur samtykt.

Umhvørvislóggávan og tað at umsita hana byggir í stóran mun á altjóða- og millumtjóðakrøv og leiðbeiningar. Útlátskrøvini til skip byggja á reglurnar í MARPOL og aðrar sáttmálar, sum sjóvinnufelagsskapurin IMO hevur samtykt í umhvørvisnevndini MEPC (Marine Environment Protection Committee). Hóast Føroyar hava atlimaskap í IMO, so taka vit ikki lut í arbeiðinum hjá MEPC, tí arbeiðs- og fíggjarorkan til at umsita umhvørvislóggávuna longu frammanundan er avmarkað.

Umhvørvisstovan, kommunurnar og harumframt Fiskiveiðieftirlitið og Sjóvinnustýrið hava eftirlit við, at umhvørvislóggávan á ávikavist landi og sjógvi verður hildin. Staðfest brot á lóggávuna verða meldað til løgregluna, og ákæruvaldið fyriskipar sum meginregla rættarsókn móti teimum, ið bróta lógir, kunngerðir ella treytir í góðkenningum og loyvum, sum eru latin við heimild í lóggávuni.

Almenna tilbúgvingin í Føroyum er sum meginregla býtt millum land og kommunur, har ið løgreglan hevur ábyrgdina av átaksøkinum á landi, MRCC/Tórshavnradio á sjónum og JRCC/Iceland hevur ábyrgdina, tá ið tilbúgvingarátakið byrjar í luftini. Hetta merkir, at landsstýrið hevur ábyrgd av at skipa eina tilbúgving, sum kann setast í verk, tá ið dálking kemur fyri uttan fyri havnirnar og út á sjómark til grannalondini.

Størru kommunurnar, hvør einsæris ella í samstarvi við aðrar kommunur, eru í dag í flestum førum væl fyri at taka sær av oljudálking inni í havnum. Oftast er tað dálking, ið stendst av bunkringsóhappum og øðrum rakstraróhappum, meðan skip liggja við bryggju. Tørvur er á at skipa eina nøktandi landsoljutilbúgving, og er uppgávan latin Landsverki. Neyðuga vitanin er fingin til vegar, men tørvur er á játtan fyri at keypa útgerð at basa oljudálking á sjónum uttan fyri havnirnar. Tað er stórur munur á tí útgerð, sum havnirnar hava brúk fyri, og tí útgerð, sum landið hevur brúk fyri. Harðbalna veðurlagið kring Føroyar hevur við sær, at stórar partar av árinum er neyðugt at útvega tunga útgerð, sum hóskar til endamálið.

## Millumtjóðaavtalur

Føroyar eru partur av tveimum millumtjóðaavtalum, ið snúgva seg um oljutilbúgving. Tann triðja er á veg. Tvær norðurlendskar avtalur eru: Keypmannahavnaravtalan og



*Mynd: Daniele Casanova*

Nordisk Redningsoverenskomst, ið verður umrødd í partinum um trygd og tilbúgving. Innlendismálaráðið umboðar Føroyar í Keypmanna-havnaravtaluni. Triðja avtalan, ið er á veg, er Arctic Marine Oil Pollution Preparedness and Response, sum arktisku ráðharrarnir væntandi fara at undirskriva á fundi í mai 2013. Løgmaður undirskrivar avtaluna vegna Føroyar.

Felags fyri hesar avtalur er, at londini binda seg til, móti gjaldi og eftir førimuni, at hjálpa hvør øðrum, tá ið stórar vanlukkur raka, sum landið sjálvt ikki er ført fyri at taka sær av. Tað snýr seg eisini um at taka burtur umsitingarligar forðingar í sambandi við at flyta útgerð og fólk millum londini. Ein sjálvsøgd fortreyt fyri hesum avtalum er, at londini hvør sær halda eina ávísa landstilbúgving móti oljudálking, tí annars eru tey ikki før fyri at veita hjálp sambært avtalunum.

Føroyar eru ikki førar fyri at hjálpa nøkrum grannalandi, um tað verður fyri ógvisligari oljudálking. Sum støðan er í dag, eru Føroyar heldur ikki sjálvbjargnar við teirri útgerð, sum er tøk í landinum. Tí kann skjótt gerast neyðugt hjá Føroyum at biðja sær hjálp úr grannalondunum. Fjarstøðan millum londini í norðurhøvum ger tó, at tað helst bara verður biðið um sjóvegis hjálp úr næstu grannalondunum, serliga úr Noregi og Íslandi. Møguleiki er tó eisini fyri at heita á donsku verjuna, Forbindelseselement Færøerne undir Arktisk Kommando, um hjálp í sambandi við oljudálking. Heitt kann eisini vera á hini grannalondini um hjálp, serstakliga viðvíkjandi loftvegis innflutningi av útgerð. Hetta er tó ein rættiliga kostnaðarmikil hjálp, ið einans verður nýtt í heilt serstøkum førum.

### Kolvetnisøkið

Á kolvetnisøkinum er skipanin tann, at tilbúgvingarkrøvini til oljufeløgini eru ásett í lóg um kolvetnisvirksemi og eini kunngerð. Eitt oljufelag, sum borar ein leitibrunn, ella sum hevur fingið loyvi at fara undir framleiðslu, hevur skyldu at halda eina dygga oljutilbúgving. Tilbúgvingin hjá felagnum skal vera so mikið góð og víðtøkin, at hon eisini verjir føroyskar firðir, víkir, sund og strendur fyri oljudálking, um ein sonevnd „blow-out" skuldi borist á. Jarðfeingi er ábyrgdarhavandi økismyndugleiki á kolvetnisøkinum og tryggjar, at oljufeløg hava eina dygga egintilbúgving, sum verður samskipað við aðrar almennar tilbúgvingarætlanir og sum kann samskipast við tilbúgvingarætlanir hjá øðrum oljufeløgum, sum leita eftir ella framleiða olju í grannalondunum.

### Møguleikar at betra um fyri-byrging, eftirlit og handhevjan av umhvørvislóggávuni

Í Føroyum er einki serbúskaparøki (Exclusive Economic Zone) lýst. Nógv lond kring heimin, sum hava tikið undir við UNCLOS (United Nations Convention on the Law of the Sea), hava lýst eitt serbúskaparøki. Hetta gevur londunum møguleika at handhevja umhvørvislóggávuna mótvegis skipum undir fremmandum flaggi, sum sigla á serbúskaparøkinum. Tá gerast heimildirnar tær somu, sum vit í dag hava innan fyri 12 fjórðingar.

Í Føroyum er heldur einki sonevnt PSSA (Particularly Sensitive Sea Area) lýst. Nógv lond kring heimin hava gjøgnum sjóvinnufelagsskapin IMO fingið lýst neyvt ásett sjóøki sum PSSA, har ið herd krøv kunnu setast skipum. Sum dømi kunnu nevnast „The Great Barrier Reef" í Australia, sjóøkið kring Galapagosoyggjar, Kanariuoyggjar og Eystarasalt. Men serliga áhugavert í hesum høpi er vesturevropeiska PSSA-økið, ið røkkur heilt úr Portugal og norður til Hetlands.

Høvuðsorsøkin til, at økið varð lýst sum PSSA í 2004, vóru tær mongu dálkingarvanlukkurnar frá tangaskipum, sum hava verið á økinum. Endamálið var at kunna hava betri eftirlit við skipaferðsluni, serliga tangaskipum á økinum.
Tað kann tí hugsast, at ávís skip, sum verða rakt av herdum avmarkingum í vesturevropeiska økinum, verða tvingað ella heldur taka støðu til at sigla nærri okkara sjóøki. Hetta verður hildið at økja um vandan fyri dálkingaróhappum á føroyskum øki. Skipaferðslan økist eisini, tí at olju- og gassframleiðslan í Barentshavinum alsamt gerst meira víðfevnd. Eisini hevur flutningur av kjarnorkuburturkasti til Russlands verið nevndur sum ein vaksandi hóttan.

IMO hevur í avgerð A.982(24) eina leiðbeining um, hvat skal til, fyri at lond kunnu søkja IMO um at fáa tilnevnt eitt sjóøki sum PSSA. Tað skulu vera sjóøki, ið eru týðandi sum vistskipanir í sjónum orsakað av lívfrøðiliga margfeldinum ella sínum viðbrekni fyri inntrivum, og sum verður mett at hava stórt virði mentanarliga, fíggjarliga, vísindaliga ella á annan hátt. Í einum PSSA-øki kunnu ítøkilig tiltøk setast í verk fyri at skipa virksemið á økinum, tað kann snúgva seg um at áseta siglingarleiðir, at áseta krøv til útlát og útgerð umborð á skipum og brúk av sjóferðsluskipanum, eitt nú VTS (Vessel Traffic Services).
Í Føroyum er heldur einki sonevnt Special Area lýst. Sambært MARPOL Annex I, II, IV og V kunnu serlig sjóøki lýsast eftir at kalla somu treytum sum PSSA, og á hesum økjum kunnu tvingandi krøv ásetast skipum til at byrgja fyr útláti av olju, eitrandi evnum, spillivatni og burturkasti.

### Niðurstøða

Greitt er, at støðan í dag ikki er nøktandi, tá ið tað snýr seg um oljubasing á sjónum. Og við vaksandi skipaferðsluni gerst tørvurin á einari vælvirkandi landstilbúgving uppaftur meira átrokandi. Sjóumhvørvismál vórðu yvirtikin í 2003 sum føroyskt málsøki. Síðan tá hevur peningur bert verður settur av einaferð á fíggjarlógini til at skipa eina landstilbúgving. Økið hevur sostatt ikki verið raðfest fíggjarliga.
Víst hevur fleiri ferðir verið á tørvin, m.a. í sambandi við fíggjarlógararbeiði, at fáa skipað eina landstilbúgving móti oljudálking og somuleiðis hvat krevst, fyri at Føroyar kunnu hava ein sonevndan „fyrstuhjálparkassa" tøkan. Hetta er ikki nøkur stór ella dýr tilbúgving og heldur ikki ein dýrur rakstur av tilbúgvingini, sí fylgiskjal 1. Í fylgiskjalinum er eisini eitt yvirlit yvir, hvør basingarútgerð er í landinum.



*Vesturevropeiska PSSA-økið.*

## TILMÆLI

- Mælt verður til, at landsins tilbúgvingarætlan fyri oljubasing á sjónum verður politiskt staðfest og raðfest, tí oljutilbúgvingin er fortreyt fyri:
  - at til ber at verja lívfrøðiliga margfeldið í vistskipanunum í sjónum og fram við landi,
  - at til ber at verja áhugamál Føroya í sambandi við ali- og fiskivinnu,
  - at til ber at handfara oljudálking á sjónum, sama um tær stava frá óhappum við skipum, havstøðum ella øðrum
  - at Føroyar kunnu taka undir við og røkja sínar skyldur í altjóða, norðurlendskum og arktiskum avtalum um millumtjóðasamstarv í sambandi við tilbúgving, og
  - at til ber at avmarka spjaðing av einari oljudálking á sjónum, meðan bíðað verður eftir hjálp úr grannalondunum.
- Mælt verður til at áseta eitt serbúskapar-øki (EEZ) fyri Føroyar, tí tað gevur øktar eftirlitsheimildir mótvegis skipum undir fremmandum flaggi.
- Mælt verður til at kanna fyrimunir og vansar við at áseta eitt PSSA uttan um Føroyar. Tað gevur eitt nú heimild til at áseta siglingarleiðir og fráboðanarskyldu.

# Trygd og tilbúgving á sjóøkinum kring Føroyar

Væntast kann, at skipaferðslan á sjóøkinum kring Føroyar fer at økjast komandi árini. Orsøkin er, at vinnuliga virksemið í Arktis er økt, og nýggjar siglingarleiðir hava tikið seg upp har um leiðir, sum stytta munandi um farleiðina millum Evropa og Asia. Vaksandi skipaferðslan setur stór krøv til trygd og tilbúgving. Tað er tí av avgerandi týdningi, at avvarðandi føroyskir myndugleikar fylgja við í teimum altjóða reglum, ið gjørdar verða, og eftir tørvi seta hesar reglur í gildi í føroyskum lógarverki.

Stoltenberg-frágreiðingin frá 2009 viðvíkjandi norðurlendskum samstarvi um uttanríkis- og trygdarpolitikk mælir til økt trygdar- og tilbúgvingarsamstarv í norðurlendskum og arktiskum høpi. Týdningarmikið er, at føroyskir myndugleikar eru við í hesum samstarvi og seta í verk skilagóð fyribyrgjandi átøk, sum kunnu stuðla tí útinnandi tilbúgvingini.

Skipaferðslan á sjóøkinum kring Føroyar – innan fyri føroyska 200 fjórðinga fiskimarkið (FFZ) – er økt seinastu árini. Talið á ferðafólkaskipum hevur verið støðugt, men talið á tangaskipum er økt munandi.

Talið á útlendskum skipum, sum í framtíðini fara at koma í føroyskar havnir, verður allarhelst alsamt vaksandi. Føroyskar fyritøkur fáa hervið møguleika fyri at veita dygdargóðar tænastur til hesi skip. Hetta setur tó økt krøv til føroyskar myndugleikar um regluliga at sýna útlendsk skip.

## Ábyrgdarviðurskifti – trygd á sjóøkinum kring Føroyar og altjóða trygd

Hugtakið trygd á sjónum er víðfevnt og fevnir m.a. um trygdina innanborðs, arbeiðsumhvørvið umborð, vind- og veðurviðurskifti og krøv til siglingarleiðir til eina økta skipaferðslu.

Sjóvinnustýrið umsitur lógina um trygd á sjónum, manningarlógina og loðslógina og tískil tey myndugleikakrøv, sum verða sett til fiski- og handilsskip og til manningarnar á teimum. Føroysk skip skulu lúka øll krøv í føroyskari lóggávu, sum í øllum førum er ájavnt við ella hægri enn altjóða krøv, og føroyskir myndugleikar hava eftirlit við, at lóggávan verður fylgd.

Av tí at flestøll lond hava tikið undir við millumtjóða-IMO-sáttmálum viðvíkjandi trygd á sjónum, er meginreglan tann, at í minsta lagi altjóða lóggáva er galdandi fyri øll skip, sum sigla í altjóða sjógvi. Føroyar hava atlimaskap í IMO, og Sjóvinnustýrið – saman við avvarðandi myndugleikum – tryggjar, at føroysk lóggáva hevur fyrilit fyri ásetingum í IMO-sáttmálum. Sjóvinnustýrið og avvarðandi føroyskir myndugleikar vórðu IMO-góðskuskoðaðir í november 2011 við góðum úrsliti.

Fyri at tryggja, at skip, sum vitja fremmand sjóøki, lúka krøvini í altjóðaásáttmálum, kunnu avvarðandi myndugleikar fremja sonevnd „Port State Control" (PSC). Í ringasta føri kann fremmandur myndugleiki halda skipum aftur, sum ikki lúka krøvini. Eitt samstarv millum 27 lond, evropeisk, og harumframt Kanada og Russland, tryggjar, at tílík eftirlit verða framd á ein skipaðan hátt, og at eftirmetingar verða gjørdar so hvørt. Felagsskapurin fyri nevndu londini aftan fyri samstarvið nevnist ParisMoU og hevur høvuðssæti í Hague í Hollandi.




*Sjóøkið kring Føroyar við markið til grannatjóðir.*

Føroyar eru ikki partur av hesum samstarvi og fremja ikki PSC-eftirlit eftir sama leisti sum áðurnevndu lond. Tað er einki skipað eftirlit við útlendskum skipum, sum koma í føroyskar havnir. Tá ið vanlukkur og oljuútlát henda, verður farið umborð at gera PSC-eftirlit, sum verður útint eftir einum serligum føroyskum leisti og sambært mannagongdum hjá Sjóvinnustýrinum. Vóru Føroyar limir í ParisMoU, høvdu føroyskir myndugleikar skyldu til at gera eitt ávíst tal av sýnum um árið (<25% av útlendskum skipum). Skip undir føroyskum flaggi, sum koma í fremmandar havnir, verða kortini sýnað av havnarmyndugleikanum sambært krøvum og leiðbeiningum frá ParisMoU.

Í IMO verður arbeitt við at gera eina sonevndan „Polar Code", ið ásetur reglur fyri, hvørji krøv skip, sum sigla í arktiskum og antarktiskum sjógvi, skulu lúka. Hesar reglur verða væntandi lidnar í 2014.

Fyri at tryggja, at skipaferðslan í og úr føroyskum havnum er trygg, er umráðandi við einari vælvirkandi loðsskipan. Løgtingslóg um havnaloðsing kom í gildi tann 1. januar 2013, og skipanin er farin

IMO er stytting fyri International Maritime Organization, ið er altjóða felagsskapurin fyri sjóferðslu hjá Sameindu Tjóðum (ST).

UNCLOS er stytting fyri United Nations Convention on the Law of the Sea, ið er altjóða havrættarsáttmálin hjá Sameindu Tjóðum (ST).

ICAO er stytting fyri International Civil Aviation Organization, ið er altjóða felagsskapurin fyri loftferðslu hjá Sameindu Tjóðum (ST).

IAMSAR er stytting fyri International Aeronautical Maritime Search and Rescue, ið er ein handbók, sum IMO og ICAO hava givið út við leiðreglum um felags mannagongdir á sjó- og loftferðsluøkinum, tá ið leiting og bjargingarátøk skulu skipast og fremjast.

SAR er stytting fyri Search and Rescue – á føroyskum leiting og bjarging – ið er eitt átak, sum ein alarmsentralur vanliga setur í verk fyri fyrst og fremst at bjarga mannalívum.




*Sjóferðsla í føroyskum sjóøki í tíðarskeiðinum 2005 til 2011. Í 2012 vóru 421 tangaskip í føroyskum sjóøki, og 49 ferðafólkaskip. Kelda: Forbindelses Element Færøerne.*

at virka. Havnirnar eru loðsstøðir, og Sjóvinnustýrið hevur eftirlit við skipanini.

Vinnumálaráðið setti í 2012 niður ein arbeiðsbólk við Sjóvinnustýrinum sum toghaldara at gera tilmæli um loðspunkt og siglingarleiðir í føroyskum sjóumveldi innan fyri 12 fjórðingar úr landi. Tilmælið er grundarlagið undir kunngerð, sum skal setast í gildi sambært løg um trygd á sjónum. Sum nevnt er í partinum viðvíkjandi umhvørvi aðrastaðni í hesum skjali, eiga føroyskir myndugleikar – sum næsta stig – at kanna møguleikan fyri at skipa sonevnd PSSA (Particularly Sensitive Sea Areas) á sjóøkinum kring Føroyar. Í hesum sambandi skulu skipast siglingarleiðir – „recommended routes" – við fráboðanarskyldu uttan fyri føroyskt sjóumveldi. Tá ið talan er um altjóða sjógv, skulu hesi øki og hesar siglingarleiðir gerast við fyriliti fyri UNCLOS og við góðkenning av IMO.

### Ábyrgdarviðurskifti – tilbúgving á sjóøkinum kring Føroyar og altjóða tilbúgving

Tilbúgvingarlógin ásetur, at føroyska tilbúgvingin byggir á økisábyrgd, og tað merkir, at hvør landsstýrismaður sær leggur til rættis eina tilbúgving á sínum øki. Føroyski høvuðstilbúgvingarmyndugleikin, sum fevnir um samanløgdu stovnarnar Fiskiveiðieftirlitið, Tilbúgvingarstovn Føroya og MRCC/Tórshavnradio, umsitur tilbúgvingarlógina og samskipar føroysku tilbúgvingina sambært hesi løg. Lógin ásetur tilbúgvingarskyldur til lands- og kommunumyndugleikar umframt privatar fyritøkur, sum reka vandafult virksemi.

Tilbúgvingarlógin ásetur, at MRCC/Tórshavnradio, sum er alarmsentralur í sambandi við hendingar á sjónum, samskipar heildarátakið út á føroyska 200 fjórðinga fiskimarkið FFZ (Faroese Fisheries Zone). MRCC/Tórshavnradio virkar annars sambært IMO- og ICAO- millumtjóðaásáttmálunum og IAMSAR-handbókini. Við støði í hesum sáttmálum og handbók er virksemið hjá MRCC/Tórshavnradio nærri lýst í SAR-handbók Føroyar, sum seinast er dagførd í juni 2012. MRCC/Tórshavn er ígjøgnum IMO lýst sum altjóða góðkend sjóbjargingarstøð, ið virkar innan fyri føroyska fiskimarkið.

Fyri at fyribyrgja óhappum er neyðugt við einum skipaðum eftirliti. Fiskiveiðieftirlitið útinnir fiskiveiðieftirlit á sjóøkinum kring Føroyar og hevur tvey vaktar- og bjargingarskip tøk til endamálið og í einum tilbúgvingarhøpi. Fiskimálaráðið hevur sáttmála við Atlantic Airways um tyrlutilbúgving, og bjargingarfeløgini stuðla sjótilbúgvingini við bjargingarbátum. Danska Verjumálaráðið – í verki Forbindelseselement Færøerne undir Arktisk Kommando (fyrr Færøernes Kommando) – stuðlar føroysku sjótilbúgvingini við skipi og tyrlu. Tað er tó einki lógarkrav um, at føroyskir myndugleikar skulu hava eftirlit við skipaferðsluni. Aðrastaðni eru tílík eftirlit, eitt nú í Grønlandi, har fráboðanarskipanin GREENPOS ásetur, at skip, sum sigla til og frá grønlendska EEZ (Exclusive Economic Zone) skulu geva sjóbjargingarstøðini í Grønlandi eina siglingarætlan fýra ferðir um samdøgrið. Fram við norsku strondini eru settar á stovn 5 VTS-støðir (Vessel Traffic Service), sum halda eyga við skipaferðsluni.

MRCC/Tórshavnradio hevur sína egnu AIS-skipan (Automatic Identification System), sum fevnir um sjóøkið kring Føroyar. Skipanin er dagliga knýtt at North Sea AIS Information Center, sum Søfartsstyrelsen (fyrr Farvandsvæsenet) í Danmark umsitur. MRCC/Tórshavnradio hevur møguleika at síggja allar AIS-dátur úr londum, sum hava undirskrivað samstarvsavtalu við Information Management Centre Norway um at útflýggja AIS-dátur. Harumframt hevur MRCC/Tórshavnradio um LRIT-skipanina (Long Range Identification and Tracking) møguleika til at fylgja føroysku handilsskipunum størri enn 300 BT og harumframt ferðafólkaskipum um allan heim. Útlendsk skip síggjast bert í skipanini, tá ið tey eru undir Føroyum. Skipanin verður dagførd 6. hvønn tíma.

Føroyski tilbúgvingarmyndugleikin luttekur í altjóða samstarvi, eitt nú í arbeiðsbólkum í Arktiska Ráðnum, har ið ein viðkomandi arbeiðsbólkur er EPPR (Emergency Prevention, Preparedness and Response). Ein samstarvsavtala um leiting og bjarging í Arktis varð undirskrivað av løgmanni vegna Føroyar á ráðharrafundi í Nuuk í 2011. Í fjør luttók tilbúgvingarmyndugleikin í sambandi við at gera samstarvsavtalu um oljutilbúgving í Arktis. MRCC/Tórshavnradio hevur samstarvsavtalur við Forbindelseselement Færøerne undir Arktisk Kommando, JRCC/Iceland og MRCC/Aberdeen í sambandi við leiting og bjarging á sjónum. MRCC/Tórshavnradio hevur í fleiri ár luttikið í NATO-venjingum – venjingin í fjør varð nevnd „Dynamic Mercy." Føroyar vórðu í 1989 fevndar av Nordisk Redningsoverenskomst (NORDRED) um tilbúgvingarsamstarv og hjálparveitingar í breiðum høpi í sambandi við vanlukkur. HAGA-fráboðanin frá 2009 tekur støði í NORDRED og mælir til styrkt tilbúgvingarsamstarv í norðurlendskum høpi.

## NIÐURSTØÐUR OG TILMÆLI,

### SUM SKULU SÍGGJAST Í SAMANHANGI VIÐ TILMÆLINI Í UMHVØRVISPARTINUM.

- Føroyar eiga at gerast limir í ParisMoU-felagsskapinum, soleiðis at Sjóvinnustýrið kann fremja „Port State Control" eftir leistinum hjá ParisMoU.

- Siglingarleiðir í føroyskum sjóumveldi eiga at verða settar í gildi sum skjótast til ber.

- Føroyskir myndugleikar eiga at fara í eina tilgongd at kanna møguleikan fyri at seta í verk eftirlits- og fráboðanarskipanir av skipaferðsluni á sjóøkinum kring Føroyar, sum er lík VTS- og GREENPOS-skipanunum. Mett verður, at ein fráboðanarskipan, ið er lík GREENPOS, er mest hóskandi at seta í verk í Føroyum heldur enn ein VTS-skipan.

- MRCC/Tórshavnradio eigur saman við Sjóvinnustýrinum at fylgja við í norðurlendska samstarvinum viðvíkjandi fylgisveina-AIS- og LRIT-skipanunum.

- Høvuðstilbúgvingarmyndugleikin eigur at taka upp samband við Felagið Sløkkiliðsleiðarar og Landsfelag Sløkkiliðsmanna fyri at fáa skipað fyri regluligum venjingum umborð á ferðamannaskipum og øðrum skipum, har kommunal sløkkiliðsfólk – í samstarvi við tilbúgvingina hjá reiðarínum – verða vand í at sløkkja eld, og í hesum sambandi eisini vand í at bráðflyta ferðafólk og manning.

- Avvarðandi føroyskir myndugleikar eiga eftir førimuni áhaldandi at vera við í arbeiðsbólkum, sum Arktiska Ráðið skipar, og annars vera við í norðurlendskum samstarvi, eitt nú Keypmannahavnaravtaluni og NORDRED.

- Høvuðstilbúgvingarmyndugleikin eigur at gera Tilbúgvingarráðið virkið, soleiðis at m.a. spurningar viðvíkjandi trygd og tilbúgving í Norðuratlantshavi og Arktis kunnu umrøðast í ráðnum. Forbindelseselement Færøerne, Sjóvinnustýrið og Landsverk, sum ikki hava fastan limaskap í Tilbúgvingarráðnum, skulu vera umboðað, tá ið hesir spurningar eru á dagsskrá í Tilbúgvingarráðnum.

# Keldur

- **Arctic Marine Shipping Assessment 2009 Report,** Arctic Council 2009
- **Arctic Climate Impact Assessment,** Arctic Council and the International Arctic Science Committee (IASC) 2005
- **Arctic Human Development Report,** Stefansson Arctic Institute 2004
- **Arctic Yearbook 2012**
- **Føroyar og Arktis – í oljuvinnuhøpi,** Jan E. Müller, Føroya Oljuídnaðarbólkur, 2013
- **Føroyar og samstarvið í Arktis.** Uttanríkisráðið 2010. Dagførd útgáva 2011
- **Megatrends,** Nordic Council of Ministers 2011.
- **OECD Territorial Reviews** – NORA Region 2011
- **Samrøða við Rúna M. Hansen,** stjóri fyri arktisku eindini hjá Statoil. Eftir Jan E. Müller, Føroya Oljuídnaðarbólkur, 2013
- **Strategy Papers on the Arctic or High North: A comparative study and analysis,** Alyson Bailes & Lassi Heininen, Centre for Small State Studies, Institute of International Affairs 2012
- **The Arctic – Proposals for the international cooperation roadmap,** Russian International Affairs Council 2011
- **The Northern Sea Route: Is It Really Ice-Free?** Joshua Ho, S. Rajaratnam School of International Studies, Nanyang Technological University, 2011
- **Vinnuligir møguleikar í Arktis.** Syntesa vegna Oljuvinnufelagið 2012.
- **Ymsar útgávur viðvíkjandi eygleiðing av ísi,** Leif Toudal Pedersen, Center for Ocean og Is, DMI

## Leinkjur til viðkomandi heimasíður

- **Arktiska Ráðið**
  www.arctic-council.org

### Arbeiðsbólkar undir Artiska Ráðnum:

- **ACAP**
  **(Arctic Contaminants Action Programme)**
  www.ac-acap.org
- **AMAP**
  **(Arctic Monitoring and Assessment Programme)**
  www.amap.no
- **CAFF**
  **(Conservation of Arctic Flora and Fauna)**
  www.caff.is
- **EPPR**
  **(Emergency Prevention Preparedness and Response)**
  www.eppr.arctic-council.org
- **PAME**
  **(Protection of the Arctic Marine Environment)**
  www.pame.is
- **SDWG**
  **(Sustainable Development Working Group)**
  www.portal.sdwg.org

### Aðrar viðkomandi heimasíður:

- **Arctic Governance Compendium**
  www.arcticgovernance.org
- **Arctic Portal**
  www.arcticportal.org
- **GeoPolitics in the High North**
  www.geopoliticsnorth.org
- **Nora**
  **(Norrønt Atlantssamstarv)**
  www.nora.fo

## Heildarætlanir

- **Kongeriget Danmarks Strategi for Arktis 2011–2020**
- **Finland's Strategy for the Arctic Region 2010**
- **Melding til Stortinget: Nordområdene. Visjon og virkemidler. Tilråding fra Utenriksdepartementet 18. november 2011, godkjent i statsråd samme dag. (Regjeringen Stoltenberg II)**
- **Sveriges strategi för den arktiska regionen 2011**
- **Developing a European Union Policy towards the Arctic Region, European Commission 2012**
- **Canada's Northern Strategy: Our North, Our Heritage, Our Future 2009**
- **US Arctic Region Policy 2009**
- **Основы государственной политики Российской Федерации в Арктике на период до 2020 года и дальнейшую перспективу 2008.**
- **A Parliamentary Resolution on Iceland's Arctic Policy, 2011**



# Orðalisti

**ACAP** – Arctic Contaminants Action Program. ACAP virkar fyri at minka útlátið av dálkingarevnum í arktisku náttúruni og at fremja millumtjóðasamstarv á arktiska økinum.

**AMAP** – Arctic Monitoring and Assessment Programme. AMAP arbeiðir serliga við at gera samanberiligar lýsingar av útbreiðsluni av umhvørviseitrandi evnum í arktisku náttúruni, og hvørji árin umhvørvisdálkingin hevur á fólkaheilsuna hjá teimum, ið búgva á arktiska økinum.

**CAFF** – Conservation of Arctic Flora and Fauna. Samstarvið snýr seg fyrst og fremst um at kortleggja og varðveita lívfrøðiligt margfeldi í Arktis.

**EPPR** – Emergency Prevention, Preparedness and Response. EPPR veitir kunnleika um fyribyrging og tilbúgving í sambandi við umhvørvisvanlukkur í Arktis.

**EEZ** – Exclusive Economic Zone – serbúskaprøki.

**FFZ** – Faroese Fisheries Zone – føroyska 200 fjórðinga fiskimarkið.

**FING –** Útbúgvingarsamstarv millum Stavanger Offshore Tekniske Skole, Verkmenntaskólinn á Akureyri, Greenland School of Minerals and Petroleum í Sisimiut og Vinnuháskúlan í Føroyum.

**IAMSAR** – International Aeronautical Maritime Search and Rescue, ið er ein handbók, sum IMO og ICAO hava givið út við leiðreglum um felags mannagongdir á sjó- og loftferðsluøkinum, tá ið leiting og bjargingaratøk skulu skipast og fremjast.

**ICAO** – International Civil Aviation Organization, ið er altjóða felagsskapurin fyri loftferðslu hjá Sameindu Tjóðum (ST).

**IMO** – International Maritime Organization. IMO er altjóða felagsskapurin fyri sjóferðslu hjá Sameindu Tjóðum (ST), har Føroyar hava atlimaskap.

**NAFO** – Northwest Atlantic Fisheries Organization. NAFO er millumtjóðafelagsskapur fyri samstarv um fiskiskap í altjóða sjógvi í útnyrðingsparti av Atlantshavi.

**NAMMCO** – North Atlantic Marine Mammal Commission. NAMMCO er ein millumtjóðafelagsskapur fyri samstarv um at verja, umsita og granska havsúgdjór í Norðuratlantshavi. Føroyar hava egnan limaskap í NAMMCO saman við Íslandi, Noregi og Grønlandi.

**NASCO** – North Atlantic Salmon Conservation Organization. NASCO er millumtjóðafelagsskapur, ið hevur ábyrgd av at umsita laksafiskiskap í Norðuratlantshavi.

**NEAFC** – North East Atlantic Fisheries Commission. NEAFC er ein millumtjóðafelagsskapur fyri samstarv um skipanir fyri fiskiskapi í altjóðasjógvi í landnyrðingspartinum av Atlantshavi.

**NORA** – Norrønt Atlantssamstarv er ein millumtjóða nevnd undir marknaðpolitiska samstarvinum undir Norðurlendska Ráðharraráðnum. NORA-økið fevnir um Grønland, Ísland, Føroyar og stranda-Noreg.

**PAME** – Protection of the Arctic Marine Environment. Samstarvið snýr seg um at verja arktiska havumhvørvið.

**PSSA** – Particularly Sensitive Sea Area – serliga viðbrekið sjóøki.

**SAO** – Senior Arctic Officials. SAO er ein fastur embætismannabólkur í Arktiska Ráðnum við umboðum á uttanríkispolitiskum stigi.

**SAR** – Search and Rescue – á føroyskum leiting og bjarging. SAR er eitt átak, sum ein alarmsentralur vanliga setur í verk fyri fyrst og fremst at bjarga mannalívum.

**SDWG** – Sustainable Development Working Group. SDWG arbeiðir fyri á burðardyggan hátt at verja og styrkja búskaparligu støðuna, mentanina og heilsuna hjá fólkunum í Arktis.

**UNCLOS** – United Nations Convention on the Law of the Sea, ið er altjóða havrættarsáttmálin hjá Sameindu Tjóðum (ST).

# Yvirlit yvir tiltøk,
## ið hava verið fyriskipað sum partur av tilgongdini

| Tíð | Tiltøk | Luttakarar | Fyriskipan |
|---|---|---|---|
| 12. mars 2012 | Fyrilestur við Martin Breum, rithøvundi, um broytingarnar í Arktis. Framløga við Kate Sanderson, táverandi deildarleiðara í Uttanríkistænastuni, um støðu Føroya í Arktis. | Alment tiltak. | Uttanríkistænastan í samstarvi við Norðurlandahúsið. |
| 24. august 2012 | Framløga og prát við Laurie Fulton, táverandi USA-sendikvinnu til Danmarkar, um støðu USA í Arktis. | Avmarkað tiltak: Landsstýrið, uttanlandsnevnd, kjarna- og samskipandi bólkur, Løgmansskrivstovan /Uttanríkistænastan. | Uttanríkistænastan. |
| 11. oktober 2012 | „Geopolitics in the Artic – the role of the Faroe Islands in the Arctic“ – fyrilestur og orðaskifti við Cleo Paskal, granskara knýttum at Chatham House. | Avmarkað tiltak: Uttanlandsnevnd, kjarna- og samskipandi bólkur, Løgmansskrivstovan / Uttanríkistænastan. | Uttanríkistænastan. |
| 30. oktober 2012 | „Arctic challenges and small states“ – fyrilestur og orðaskifti við Alyson Bailes, gestaprofessara á Háskúla Íslands. | Alment tiltak. | Uttanríkistænastan. |
| 6. november 2012 | „Den arktiske rigsstrategi“ fyrilestur við Klavs A. Holm, arktiskum sendiharra. Framløga við Hannu í Horni, føroyskum umboð í Arktiska Ráðnum. | Alment tiltak. | Uttanríkistænastan í samstarvi við Fróðskaparsetrið. |
| 20. november 2012 fyrrapart | Verkstova um, hvussu Føroyar gagnnýta nýggju møguleikarnar, ið standast av broytingunum í Arktis. | Avmarkað tiltak: Umboð úr bæði privata og almenna geiranum í sambandi við sjóvinnu, kolvetnisvinnu og tænastuvinnur. | Uttanríkistænastan í samstarvi við Norðurlandahúsið. |
| 20. november seinnapart | Fyrilestur við Rasmus Gjedssø Bertelsen, post. doc., Aalborg Universitet, um avbjóðingar fyri smá samfeløg í Norðri. Fyrilestur við Ólavi Gregersen, stjóra í Syntesu, um vinnuligar møguleikar í Arktis. Høvuðsniðurstøður frá fyrrapartinum lagdar fram. | Alment tiltak. | Uttanríkistænastan í samstarvi við Norðurlandahúsið. |
| 24. januar 2013 | Verkstova um framtíðarfiskiveiðu í Arktis. | Avmarkað tiltak: Umboð fyri Havstovuna, Fiskimálaráðið og vinnuna. | Uttanríkistænastan. |
| 5. februar 2013 | Verkstova um gransking í arktiskum høpi. | Avmarkað tiltak: Umboð fyri Havstovuna, Fróðskaparsetrið, Mentanmálaráðið, Umhvørvisstovuna, Jarðfeingi, Granskingarráðið, útbúgvingarstovnar, Søvn Landsins og Fiskimálaráðið. | Uttanríkistænastan. |
| 11. mars 2013 | Verkstova um umhvørvi, trygd og tilbúgving. | Avmarkað tiltak: Umboð fyri Innlendismálaráðið, MRRC, Fiskimálaráðið, Agenda 21, Arktisk Kommando, løgregluna, Jarðfeingi, Landsverk, Fiskiveiðueftirlitið, Skipaeftirlitið og Vinnuháskúlan. | Uttanríkistænastan |

# FYLGISKJAL 1

## Tilmæli til landsstýrið og løgtingið
## um
## keyp av útgerð at basa oljudálking á sjónum

Landsverk og Umhvørvisstovan hava gjørt uppskot til **„Tilbúgvingarætlan fyri oljubasing á sjónum“.** Ein ætlan, sum fevnir um ábyrgdarøkið hjá landinum, sum er sjóøkið innanfyri 200 fjórðingar og heilt inn til havnaløgini í kommununum. Tilbúgvingarætlanin krevur eitt útgerðarstig, sum ikki er tøkt í landinum í dag, tí lætta útgerðin hjá kommununum hóskar seg bara til oljudálkingar inni í havnum o.t.

**Stevnumið landsins er**

1. *at* hava ein landstilbúgving, sum megnar at avmarka skaðiligu avleiðingarnar av eini dálking, har 1500 tons av olju eru farin á sjógv í føroyskum havøki, og
2. at basa smærri kemiskum dálkingum, sum eru sjónligar á sjónum, t.v.s. har dálkingin er meinlík eini oljudálking.

Tilbúgvingin verður skipað soleiðis, at til ber við størst møguligari vissu at avmarka skaðarnar á náttúru og umhvørvi, og at minka um útreiðslurnar at endurreisa náttúruna í sama stand sum hon var, áðrenn dálkingina. Niðanfyri er uppskot til ein fyrstahjálparkassa við basingarútgerð. Við hesi útgerð kann landstilbúgvingin steðga stóra spjaðing av einari 1500 tons oljudálking. Útgerðin er ikki nøktandi til at basa so stóra dálking. Til hetta krevst enn meira útgerð, sum má innflytast frá okkara samstarvslondum sambært millumlanda avtalum. Útgerðarpakkin tekur fyrilit fyri vánaligum veðurlíkindum, aldu og streymi og ymiskleikan við sjóvarmálan kring oyggjarnar.

| TILMÆLI UM KEYP AV BASINGARÚTGERÐ TIL LANDSTILBÚGVINGINA | | |
|---|---|---|
| **Nøgd** | **Slag** | **Prísur** |
| 1500 m | Tungar sperrur[1] | 6 mió kr. |
| 1000 m | Medium sperrur[2] | 3,5 mió kr. |
| 2 stk | Skimmarar[3] | 1,5 mió kr. |
| 1 stk | Serligur upptakari[4] | 1 mió kr. |
| 200 m3 | Flótandi goymslutangar | 1 mió kr. |
| 100 sett | Trygdarklæðir og løtt amboð | 1 mió kr. |
| **Tilsamans í bíligastu 2011-prísum** | | **14 mió. kr.** |

**Mælt verður til**, at landsstýrið arbeiðir fyri einari játtan á fíggjarlógini til keypið. Talan er um útgerð av slagnum RO CLEAN, sum er sama slag útgerð, sum varð keypt til landið fyri umleið 20 árum síðani. Hetta er bíligasta útgerðin, sum funnin er á nærmarknaðinum. Vansin við útgerðini er, at hvør sektión í flótisperrunum skal pumpast við luft, so hvørt sum sperran verður flotað.

Íløgan í útgerð kann til dømis spjaðast yvir 3 samanhangandi fíggjarár á ávikavist 5 mió. kr., fyrsta árið, 5 mió. kr. næsta árið og 4 mió. kr. triðja ári.

Rakstrarkostnaðurin av útgerðini, t.e. viðlíkahald, venjing í brúk av útgerð og goymsla verður mett at kosta umleið 500.000 til 1 mió. kr. árliga. Landsverk ger rakstrarætlan og metir um útreiðslurnar. Metast skal eisini um inntøkurnar, sum Landsverk fær av útleigu av útgerð í sambandi við oljudálkingar í kommunalum ábyrgdarøki, fyri endurgjald frá dálkarum í.s.v. brúk av útgerðini til oljubasingarátøk umfram leigugjald, um útgerð og manning verður leigað út til grannalondini sambært millumlanda avtalum um sínámillum hjálp innan tilbúgving.

*1 Sperrur, ið klára eina signifikanta alduhædd á 2,5 metur, og tí kunnu brúkast á opnum havi.*
*2 Sperrur at brúka inni í firðum, har aldurnar ikki eru so høgar, at verja viðkvæmar strandaleiðir.*
*3 Skimmarar at pumpa oljuna upp úr sjónum.*
*4 Nýtt slag av upptakara, sum trolar oljuna saman í ein posa, sum hongur afturúr.*



# Yvirlit yvir útgerð at taka upp olju við í Føroyum

| Kommuna/ Virkið | Ábyrgdarhavnadi | | Staður | Flótisperrur | Flótisperrur | Flótisperrur | Flótisperrur | Flótisperrur | Absorbentar | | | | | | | | SKIMMARI | | | abs. Mátta | Katta-grús | Persónlig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | Rolus | Norlense | RO-Clean | Exspandia 3000 | Nofi boombag | 20/30 | 10/30 | 10/12,5 | 12,5/25 | 20/12,5 | 20/5 | Ukendt type | 20/12,5 | Lamor (tungolja) | Desmi | KOMARA 20 | Ergon | | Trygdar-útgerð |
| | | | | 50 cm høgt | 65 skjúrt | | 25 cm. Skjúrt | 25 cm. Skjúrt | | | | | | | | v/skjúrti | PowerPack | 2m3 | | 50x40 | | |
| | | | | | | | | | diesel | diesel | diesel | diesel | diesel | diesel | diesel | diesel | | | | | | |
| | | | | Samlað longd | Samlað longd | Samlað longd | Samlað longd | Samlað longd | Samlað longd | | | | | | | | | | | | | |
| | navn | telefon | | m | m | m | m | m | m | m | m | m | m | m | m | m | stk. | | stk. | stk. | kg | stk |
| Tórshavnar Sløkkilið | | | Tórshavn | 125 | | | | | | | | | 125 | | | 75 | | | 1 | | 50 | |
| Tórshavnar Havn | | | Á Sundi | | | 250 | | | | | | | | | | | | 1 | | | | |
| Tórshavnar Sløkkilið | | | Kollafjørður | | | | | | | | | | 125 | | | 75 | | | | | | |
| Skálafjarðar Sløkkilið | | | Runavík | | | | | 200 | | | | | 175 | | | 125 | | | 1 | | 35 | |
| Skálafjarðar Sløkkilið | | | Søldarfjørður | | | | | | | | | | | | | 150 | | | | | | |
| Skálafjarðar Sløkkilið | | | Skála | | | | | | | | | | 75 | | | 100 | | | | | 33 | |
| Skálafjarðar Sløkkilið | | | Strendur | | | | | | | | | | | | | 50 | | | | | 16 | |
| Suðuroyar Syðra Sløkkilið | | | Vág | | | | | | | | | | | | | 75 | | | | | 15 | |
| Tvøroyari Sløkkiliðið | | | Tvøroyri | | | | | | | | | | 100 | | | 100 | | | | | 15 | |
| Klaksvíkar Sløkkilið | | | Klaksvík | | | | | 200 | | | | | 375 | | | 400 | | | 1 | | 35 | |
| Eysturkommuna | | | Leirvík | | | | | | | | | | 25 | | | | | | | | 4 | |
| Sørvágs Sløkkilið | | | Sørvágur | | | | | | | | | | 50 | | | 150 | | | | | 10 | |
| Miðvágur/ Sandavág Slø. | | | Miðvágur | | | | | | | | | | 200 | | | | | | | | 10 | |
| Sløkkiliðið í Fuglafirði | | | Fuglafjørður | | 300 | | | 175 | | | | | | | | | | | 1 | | | |
| Fuglafjarðar Havn | | | Fuglafjørður | | | | | | | | | | 150 | | | 150 | 1 | | | | | |
| Sløkkiliðið Sundalagið | | | Oyrabakki | | | | | | | | | | | | | | | | | | 4 | |
| Pauli Einarsson | | | Tórshavn | | | | 300 | | | | | | 625 | | | 625 | | | | | | |
| Vest Pack | Thomas B. Thomsen | 236102 | Vestmanna | | | | | | | | | | | | 875 | | | | | | | |
| SEV | Jákup Sørensen | 227401 | Sund | | | | | | | | | | | | | 75 | | | | 100 | 50 | |
| SEV | Palli Mortensen | 227403 | Vági | | | | | | | | | | | | | | | | | | 80 | |
| SEV | Hans J. Petersen | 227402 | Strond | | | | | | | | | | | | | | | | | 180 | 33,5 | |
| Magn | | | Tórshavn | | | | | | | | | | 80 | | | | | | | | | |
| Effo | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| FVE | Jens Midjord | 291023 | Á Hjalla | 400 | | | | | 1200 | 30 | | | | | | | 1 | | 1 | | | |
| Landsverk | Fríðrik Heinesen | 290888 | Havnadal | | | | | | | | 200 | 50 | | 125 | | 225 | | | | | | 100 |
| Landsverk | Ernst Vágsgarð | 290930 | Hvannasund | | | | | | | | | | | 25 | | | | | | | | |
| Landsverk | Ernst Vágsgarð | 290930 | Syðradalur | | | | | | | | | | | 25 | | | | | | | | |
| Tilsamans: | | | | 525 | 300 | 250 | 300 | 575 | 1200 | 30 | 200 | 50 | 2105 | 175 | 875 | 2375 | 2 | 1 | 5 | 280 | 390,5 | 100 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Flótisperrur tils. | 1950 | m | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Absorbentar tils. | 7010 | m | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |





Løgmansskrivstovan – Uttanríkistænastan
Tinganes
Postrúm 64
110 Tórshavn
Tlf: +298 306000
www.tinganes.fo
Teldupostur: info@tinganes.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
541 705
FØROYAPRENT

